UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Fylgiskjal 24

7. mars 2022

Mál: 21/02266
21/03451

Ummælisskjal til uppskot til løgtingslóg um náttúruvernd og uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um náttúrufriðing

Gevið gætur:

> *Nummur á lógargreinum, sum umrøddar verða í hoyringarsvarunum, eru í summum førum broytt samsvarandi broytingum, sum gjørdar eru í uppskotinum, síðan tað varð sent til hoyringar.*

Yvirfriðingarnevndin
1. Yvirfriðingarnevndin mælir frá at strika § 1, stk. 1, í løgtingslóg um náttúrufriðing. Sagt verður, at ásetingin ásetur endamálið við lógini, sum er at verja náttúruna fyri tí, sum kann skemma og misprýða. Hóast hetta fyrilitið verður nevnt fleiri staðni í lógini, heldur yvirfriðingarnevndin tað hava týdning at gera greitt í innganginum til lógina, at lógin yvirskipað skal røkja landslagsestetisk fyrilit.

Til 1
Umhvørvis- og vinnumálaráðið tekur tilmælið til eftirtektar, soleiðis at § 1, stk. 1, verður varðveitt.

2. Yvirfriðingarnevndin heldur, at yvirfriðingarnevndin framhaldandi skal kunna mæla til at friða økir, sløg o.a.

Til 2
Yvirfriðingarnevndin sipar helst til, at yvirfriðingarnevndin eftir § 8 í galdandi náttúrufriðingarlóg kann mæla landsstýrinum til at áseta, at *sløg ella plantu- og djórasamfeløg, eisini jarðfrøðilig fyribrigdi, hvørs varðveiting av natúrvísindaligum ella søguligum orsøkum ber í sær munandi áhuga, skulu vera friðað í øllum ella pørtum av landinum*.

Orsøkin til, at henda ásetingin í náttúrufriðingarlógini, sum ongantíð er brúkt, verður strikað, er, at hetta myndugleikaøkið verður lagt undir landsstýrismannin. Fyri at skott skal vera ímillum teir ymisku myndugleikaleiklutirnar, verður tilmælið ikki tikið til eftirtektar.

Men hóast yvirfriðingarnevndin eftir uppskotinum ikki longur skal hava nakran myndugleikaleiklut við atliti at friðingartiltøkum til at verja lendi og dýra- og plantusløg, verður einki til hindurs fyri, at hon kann mæla landsstýrismanninum til friðingartiltøk.

Fiskimálaráðið

1. Fiskimálaráðið vísir á, at § 6, stk. 1, í uppskotinum til náttúruverndarlóg, sum ásetur, at veiða og onnur tøka av dýrum, sum natúrliga liva vill, bara skal kunna fara fram sambært lóg ella avgerð við heimild í lóg, broytir verandi rættarstøðu við atliti at kópaveiðu. Verandi rættarstøða er, at við tað at kópaveiða ikki er skipað við lóg, er hon loyvd. Tó setur djóravælferðarlógin forboð fyri at skjóta kóp við høgli, og alilógin setur forboð fyri tilætlað at avlíva havsúgdjór í sambandi við alivirksemi. Fiskimálaráðið sigur, at støða má takast til, hvat ið rættarstøðan viðvíkjandi kópaveiðu skal vera.

Til 1

Meginreglan í § 6, stk. 1, í uppskotinum til náttúruverndarlóg skal tryggja, at øll veiða og tøka av dýrum, sum natúrliga liva vill, fer fram sambært lóg.

Sama meginregla geldur í hinum Norðurlondunum, sbr. eitt nú § 3, stk. 1, í donsku *lov om jagt og vildtforvaltning*:

> **§ 3.** Jagt må kun drives på vildt, der er fastsat jagttid for, og kun inden for den jagttid, der er fastsat for arten.

Tá ið talan er um fugl, skilst sama meginregla eisini á § 17, stk. 1, í føroysku fuglaveiðulógini, sum ásetur, at allur fuglur, sum ikki er tilskilaður í fuglaveiðulógini, er friðaður fyri skjóting og veiðu.

Sum er, verður kópur ikki veiddur í Føroyum, men hvat ið rættarstøðan skal vera frameftir, fer at standa til Fiskimálaráðið sum varðandi av málsøkinum og løgtingið.

Er eingin geiralóggáva, sum heimilar veiðu og tøku av einum slag, kann landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum sambært § 7, stk. 1, í uppskotinum til náttúruverndarlóg loyva tøku m.a. til at verja plantur og dýr, til at verja fyri skaða á grøði, til at verja húsdýr, fisk, vatn ella aðra ogn og til at tryggja almenn heilsu- og trygdarfyrilit ella onnur týðandi almenn áhugamál.

Náttúrufriðingarnevndin fyri Suðuroyar sýsla

1. Náttúrufriðingarnevndin fyri Suðuroyar sýslu ásannar, at friðingarheimildirnar í galdandi náttúrufriðingarlóg lítið og einki hava verið brúktar, og at lógaruppskotini tí ikki fara at ávirka arbeiðið hjá náttúrufriðingarnevndunum stórvegis.

Til 1

Tikið til eftirtektar.

2. Náttúrufriðingarnevndin fyri Suðuroyar sýslu mælir til, at orðið *eigur* í § 2, stk. 2, í náttúrufriðingarlógini, verður broytt til *skal*. Sagt verður, at tað í dag er rættiliga tilvildarligt, í hvørjum førum friðingarmyndugleikarnir verða kunnaðir um bygging innangarðs.

Ásetingin er í dag soljóðandi:

> *Stk. 2.* Innangarðs eigur ikki at verða bygt uttan loyvi frá friðingarnevndini:
> 1) Undir bakkanum frá vallingini og omaneftir og á økir, ið eru upp til 100 m frá bakkatromini, har eingin fjøra er frá meginflóðarmálanum,
> 2) nærri enn 300 m frá teimum viðalundum, ið Føroya viðalundanevnd hevur um hendi,
> 3) nærri enn 300 m frá vøtnum, ið hava størri vídd enn 1 ha og frá áum, ið eru meira enn 4 m breiðar í botninum.

Til 2

Tilmælið verður tikið til eftirtektar og ásetingin broytt samsvarandi.

3. Náttúrufriðingarnevndin fyri Suðuroyar sýslu vísir á, at tað stundum kann vera trupult at fáa bygningar og útbúnað, sum ikki longu verða brúktir til upprunaendamálið ella annað rímiligt endamál, og sum náttúrufriðingarmyndugleikarnir upprunaliga hava givið loyvi til, burturbeindar. Víst verður á, at slíkar leivdir skemma náttúruna, eitt nú gamlar vindmyllur, sendimastrar, virkisbygningar og gamal aliútbúnaður, har ið teir upprunaligu eigararnir í mongum førum eru farnir av knóranum ella ikki hava vilja ella fíggjarorku til at beina burtur. Náttúrufriðingarnevndin fyri Suðuroyar sýslu mælir til at umhugsa, hvussu almennu Føroyar kunnu tryggja sær, at slíkar leivdir verða burturbeindar, tá ið tær ikki longur verða brúktar til upprunaendamálið, og hvussu sleppast kann undan, at burturbeiningin dregur út, tí at ógreitt er, hvør ið skal taka stig til og rinda fyri hana.

Til 3

Dálking og burturkast eru fevnd av løgtingslóg umhvørvisvernd.

Í kunngerð nr. 147 frá 19. oktobur 1995 um burturkast, sum broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. septembur 2007, er ásett:

> **§ 15.** Kommunustýrið skal um neyðugt fyri at fyribyrgja og basa ampum av burturkasti, geva boð um, hvussu burturkastið skal goymast, handfarast, v.m., harundir at burturkastið skal verða burturbeint innan nærri ásetta freist.
>
> *Stk. 2.* Um boð eftir stk. 1 ikki eru lýdd innan ásettu freistina, skal kommunustýrið beina burturkastið burtur fyri rokning hjá tí, ið hevur fingið boðini.
>
> *Stk. 3.* Um tað ikki ber til at ávísa hvør hevur ábyrgdina av burturkasti, sum liggur og rekst, ella á annan hátt ikki er tikið upp og burturbeint samsvarandi reglunum í hesi kunngerð, hevur kommunustýrið ábyrgdina av upptøkuni, og at beint verður fyri burturkastinum.

Í kunngerð nr. 53 frá 1994 um umhvørvisreglur, sum seinast broytt við kunngerð nr. 111 frá 7. semptembur 2009, er ásett:

> **§ 3. Toftir.** Bý- ella bygda(r)ráðið kann geva eigara ella grundeigara boð um, at toftir og leivdir yvirhøvur av bygningum, og ikki liðugt bygd hús, sum standa at detta niður ella hava staðið hálvgjørd í nógv ár, skulu takast niður minst 15 cm undir lendið og um hvussu tey skulu verða beind burtur, jvb. tó løgtingslóg um friðan av fornminnum og bygningum.

Í kunngerð nr. 72 frá 27. juni 2016 um bygningskunngerð 2017 er ásett:

1.5 Niðurtøka av bygging

Stk. 1 Niðurtøka av bygging skal fráboðast kommunala byggimyndugleikanum áðrenn niðurtøkuna.	(1.5, stk. 1) Niðurtøka av friðaðum byggingum, lutum og bygningum, ið eru verdir at varðveita, krevur loyvi frá viðkomandi friðingarmyndugleikum. Í serstøkum byggisamtyktum kunnu vera ásetingar um varðveitslu av verandi bygging, soleiðis at byggingin bert kann takast niður við loyvi frá kommunala byggimyndugleikanum.

Í løgtingslóg nr. 19 frá 16. september 1948 um friðan av fornminnum og bygningum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, er ásett:

> **§ 2.** Landsstýrið letur gera staðarskipaðan lista yvir verðsligar byggningar ella byggningspartar, sum verða at friða. Á listan, ið verður kannaður 5. hvørt ár, mega til hvørja tíð bert verða tiknir byggningar ella byggningspartar, sum hava listarligt ella søguligt virði og vanliga eisini eru yvir 100 ára gamlir.
>
> Umliggjandi øki innan fyri 100 m frá friðaðum bygningum kann verða lagt undir friðing samsvarandi reglunum í § 1.
>
> […]
>
> **§ 5.** Ynskir ánarin av byggningi, ið stendur á listanum, at ríva hann niður, skal hann 3 mánaðir frammanundan geva landsstýrinum boð um tað. Heldur stýrið eftir ummælinum frá fornminnisnevndini, at tað er ikki nóg stór grund til at seta seg ímóti niðurríving, fær ánarin boð um hetta, og ánarin kann eftir móttøku av hesi frásøgn fara undir niðurrívingina. Heldur landsstýrið, at byggningurin er verdur at varðveita, kann tað gera tiltak til at ogna hinum almenna hann, um neyðugt við tøku, við peningsveitan á fíggjarlógini ella við serligari lóg. Í slíkum føri kann ánarin ikki fara undir niðurrívingina, áðrenn tað er endaliga avgjørt, at hitt almenna ikki ynskir at ogna sær byggningin.

4. At enda Náttúrufriðingarnevndin fyri Suðuroyar sýslu til at umhugsa, um tað ikki hevði verið skilagott at latið staðbundin umboð luttikið í málsviðgerðini av komandi náttúruverndarmálum. Víst verður á, at nógvur kunnleiki og vitan um staðbundin náttúruviðurskiftir finst kring landið. Mælt verður í sama viðfangi til at umhugsa, hvussu myndugleikin frameftir skal hava eftirlit við, at avgerðir og treytir, sum verða tiknar og settar sentralt, verða fylgdar á staðnum.

Til 4

Lógaruppskotið leggur upp til, at sjálv fyrisitingin av náttúruverndarmálum verður løgd til eina fakliga náttúrufyrisiting undir landsstýrismanninum, men í viðmerkingunum til lógaruppskotið verður dentur lagdur á hetta spyrja allar viðkomandi áhugapartar til ráðs, sbr. m.a. tær serligu viðmerkingarnar til § 18:

> Tá ið farið verður undir verndararbeiði eftir kapitli 4, eigur frá byrjan at verða miðað eftir góðum samstarvi við jarðareigarar, rættindahavarar, ávirkað vinnuáhugamál, umboð fyri fólk á staðnum, kommununa og aðrar viðkomandi myndugleikar. Vil myndugleikin taka onnur við í málsviðgerðina, t.d. serliga ávirkaðar brúkarar, er eisini høvi til tað. Í hvønn mun brúkararnir eiga at verða tiknir við í hetta arbeiðið, veldst um tilknýtið, sum teir hava til økið, sum talan er um. Í sambandi við málsfyrireikingina eiga tey ymisku áhugamálini at verða vigað neyvt upp ímóti hvørjum øðrum. Sostatt eigur myndugleikin at miða eftir at fáa í lag eina málsviðgerð, har ið øll, sum ávirkað verða, fáa høvi at taka lut á bestan hátt til at gera greiðu fyri bæði ósamsvarandi og samsvarandi áhugamálum, og hvussu málsviðgerðin skal fara fram. Verndararbeiði byrjar vanliga við náttúrufakligum skrásetingum av verndarvirðum. Longu á hesum stiginum eigur at miðast eftir at fáa í lag samstarv við jarðareigarar, rættindahavarar og fólk á staðnum. Samstarvið kann vera av heilt praktiskum slag og kann t.d. snúgva seg um atgongd at ognunum ella staðbundnan kunnleika. Málsviðgerðin skal skapa sum mest av greidleika um endamál, verndarvirðir og brúk á staðnum og kunnleika um økismørk og avleiðingar av verndini. Við avleiðingum meinast fyrst og fremst, hvørjar ræðisreglur ið kunnu vera viðkomandi, bæði fyri tann einstaka jarðareigaran ella rættindahavaran og fyri fólkið á staðnum ella almenningin yvirhøvur. Myndugleikin eigur at skipa málsviðgerðina soleiðis, at tær neyðugu upplýsingarnar verða fingnar til vega, eisini tá ið tær mugu fáast frá rættindahavarum og fólki á staðnum. Serlig vitan um, hvat ið er staðbundið brúk av økinum, og hvat ið fólk á staðnum veit frá verndarvirðum í økinum at siga, kann fáast til vega við hoyring á staðnum og fundum við fólkið á staðnum.

Eisini kann nevnast, at sambært § 25 skal verndarætlanin almannakunngerast, áðrenn uppskot til verndarkunngerð verður orðað. Hetta so at allir viðkomandi áhugapartar fáa høvi at siga sína hugsan.

> **§ 25.** Áðrenn uppskot til verndarkunngerð eftir § 19 verður orðað, skal landsstýrismaðurin almannakunngera verndarætlanina við teimum týdningarmestu avleiðingunum, sum økisverndin kann væntast at fáa. Eigarar og rættindahavarar skulu, alt tað er gjørligt, kunnast beinleiðis og fáa rímiliga freist at koma við viðmerkingum til verndarætlanina.

Kommunufelagið

1. Kommunufelagið heldur tað vera óheppið at strika § 9 í galdandi náttúrufriðingarlóg, sum ásetur, hvat ið ein lendisfriðing eftir § 6 í lógini ber í sær, um ikki annað er ásett við úrskurði. Sagt verður, at hetta kann hava óhepnar avleiðingar við sær fyri náttúru og umhvørvi í kommununum.

Til 1

Orsøkin til, at *allar* ásetingarnar um friðing av lendi og dýra- og plantusløgum verða strikaðar í galdandi náttúrufriðingarlóg, er, at uppskotið til náttúruverndarlóg ásetur nýggjar og munandi meira fjøltáttaðar reglur um skipan av verndarøkjum og vernd av dýra- og plantusløgum. Eftir uppskotinum til náttúruverndarlóg verður tað landsstýrismaðurin, sum við kunngerð skal kunna seta slík verndartiltøk í verk, og ein faklig náttúrufyrisiting undir landsstýrismanninum, sum skal skipa og sita fyri verndini í verki. Mett verður, at tey nýggju verndaramboðini fara at gagna náttúru og umhvørvi heldur enn øvut.

2. Kommunufelagið heldur tað vera óheppið at gera so víðfevndar broytingar í náttúrufriðingarlógini og ber ótta fyri, at lógin verður trupul at umsita og gjøgnumskoða, og at skeivar ella ólógligar avgerðir í ringasta føri fara at verða tiknar. Skulu allar tær ætlaðu broytingarnar í náttúrufriðingarlógini fremjast, mælir Kommunufelagið í staðin til at gera eina nýggja lóg við nýggjum samanhangandi viðmerkingum ella at tvinna tey bæði lógaruppskotini saman í eitt.

Til 2

Ásetingarnar, sum verða eftir í náttúrufriðingarlógini, eru ásetingarnar um byggiforboð uttangarðs og í ávísum økjum innangarðs, t.e. nærindis bakka, viðarlundum og størri áum og vøtnum, og um loyvi til arbeiðir, sum kunnu broyta sermerkt landslag munandi ella týna leivdir av sermerktari náttúru. Hesar ásetingarnar, har ið friðingarnevndirnar og yvirfriðingarnevndin í nógvum førum eru eitt slag av byggimyndugleika við síðuna av kommunustýrinum, hoyra meira heima í skipanarlóggávu enn náttúruverndarlóggávu, og tí eru tær ikki tiknar við í uppskotið til náttúruverndarlóg. Virksemið hjá friðingarnevndunum eftir galdandi náttúrufriðingarlóg hevur mestsum burturav verið at taka støðu til bygging í nevndu økjum, og síðsta galdandi friðing eftir lógini varð lýst í 1988. Tí verður ikki talan um nevningarverda broyting í virkseminum hjá friðingarnevndunum.

Ásetingarnar um byggiforboð kunnu í framtíðini væntast at gerast partur av dagførdari ella nýggjari skipanarlóggávu, og tí verður tilmælið um annaðhvørt at gera eina nýggja náttúrufriðingarlóg ella at samantvinna náttúrufriðingarlógina við uppskotið til náttúruverndarlóg ikki tikið til eftirtektar.

3. Kommunufelagið vísir á, at undirheitið á lógaruppskotinum til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um náttúrufriðing sipar til avtøku av friðingarnevndum heldur enn friðingarheimildum.

Til 3

Talan er um eina villu, sum verður rættað.

4. Kommunufelagið mælir til at dagføra leistin at velja fólk í friðingarnevndirnar og yvirfriðingarnevndina. Mælt verður til, at helvtin av limunum og tiltakslimunum, sum landsstýrismaðurin eftir galdandi lóg velur í friðingarnevndirnar og yvirfriðingarnevndina, verður latin kommununum at velja.

Til 4
Broytingarnar, sum í hesum sambandi verða gjørdar í løgtingslóg um náttúrufriðing, eru fylgibroytingar til løgtingslóg um náttúruvernd. Aðrar broytingar verða ikki gjørdar í løgtingslóg um náttúrufriðing í hesum umfarinum.

5. Kommunufelagið sigur, at tá ið talan er um heilt nýggja rammulóg, sum gevur landsstýrismanninum so víðar heimildir, eiga uppskot til kunngerðir at verða kunngjørd saman við lógaruppskotinum, so at allir viðkomandi partar fáa eina veruliga fatan av, hvat ið kann væntast at verða sett í verk.

Til 5
Náttúru- og umhvørvisvernd er so teknisk og dynamisk, at illa ber til at áseta neyvar reglur um ítøkilig verndartiltøk í lóg. Tí er vanligt allastaðni um okkara leiðir at áseta yvirskipaðar reglur í rammulóg, sum so heimilar tí útinnandi myndugleikanum at áseta neyvari reglur á økinum og tilskilar endamál, viðkomandi fyrilit o.s.fr.

Ítøkilig verndartiltøk skulu byggja á dygt vitanargrundarlag, og tí verður tað ein faklig náttúrufyrisiting, sum fer at seta út í kortið og ráðgeva landsstýrismanninum um ítøkilig verndartiltøk eftir lógini. Í sambandi við møgulig verndartiltøk eftir lógini verða viðkomandi partar hoyrdir.

Tilmælið verður ikki tikið til eftirtektar.

6. Kommunufelagið metir, at krøv eiga at verða sett tí kunngerðarfyrireikandi arbeiðinum hjá landsstýrismanninum, so at landsstýrismaðurin skal biðja viðkomandi myndugleikar og viðkomandi yrkiskunnleika um tilmæli. Mælt verður til at áseta eitt slíkt krav í lógini.

Til 6
Sambært teimum almennu viðmerkingunum til uppskotið til náttúruverndarlóg skal sitast fyri lógini samsvarandi vitanarregluni, sum áleggur fyrisitingarmyndugleikanum, so langt sum tað er rímiligt, at byggja á tøka vísindaliga vitan um stovnsstøðuna hjá sløgum, útbreiðsluna og tann vistfrøðiliga standin hjá náttúrusløgum og virknaðin av árinum. Tað fer at liggja á fyrisitingarmyndugleikanum at útvega nóg dygt vitanargrundarlag í hvørjum føri, m.a. gjøgnum samskifti við viðkomandi myndugleikar, fakstovnar o.o.

Tilmælið verður ikki tikið til eftirtektar.

7. Kommunufelagið vísir á, at í § 11, stk. 2, í uppskotinum til løgtingslóg um náttúruvernd verður víst til § 26, men at tær serligu viðmerkingarnar vísa til § 28.

Til 7
Talan er um eina villu, sum verður rættað.

8. Kommunufelagið vísir á, at uppskotið til løgtingslóg um náttúruvernd sambært teimum almennu viðmerkingunum ikki kann væntast at fáa fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar, men sambært talvuni, sum vísir tær samlaðu avleiðingarnar, *fær* uppskotið slíkar avleiðingar.

Til 8
Talan er um villur í talvuni, sum verða rættaðar.

Hagafelag Føroya (Hagafelagið)
1. Hagafelagið fegnast um, at landsstýrið tekur stig til nýggja náttúruverndarlóggávu.

Til 1
Einki at viðmerkja.

Ferðavinnufelagið
1. Ferðavinnufelagið mælir til at laga § 25 um almannakunngering av verndarætlanum til, so at tað verður ásett, at Ferðavinnufelagið og/ella Visit Faroe Islands og tey, sum fáast við ferðavinnu í økinum, fáa beinleiðis boð.

Til 1
Tað verður ikki mett at vera neyðugt hjá øðrum áhugapørtum enn eigarum og rættindahavarum at fáa beinleiðis boð, tá ið verndarætlanir verða almannakunngjørdar eftir § 25.

Tilmælið verður ikki tikið til eftirtektar.

Havstovan
1. Havstovan mælir til, at § 24, stk. 2, nr. 5, umframt at nevna jarðfrøðilig fyribrigdir nevnir havfrøðilig fyribrigdir.

Til 1
Havfrøði er sum ein grein av jarðvísindum læran um gransking av heimshøvum. Havfrøði fevnir um nógv ymisk evnir av eitt nú lív-, evna-, jarð, veður- og alisfrøðiligum slag.

Mett verður, at § 24, stk. 2, longu í verandi líki fevnir um teir náttúrumargeldistættirnar í havfrøðini, sum tað er viðkomandi at verja eftir náttúruverndarlógini, sbr. eisini endamálsásetingina í § 1 í lógaruppskotinum.

Tilmælið verður ikki tikið til eftirtektar.

Jarðfeingi
1. Jarðfeingi vísir á, at endamálsásetingin í § 1 í lógaruppskotinum nú nevnir *at røkja margfeldið* heldur enn *at røkja tað lívfrøðiliga, landslagsliga og jarðfrøðiliga margfeldið*, sum sagt varð í uppskotinum til náttúrumargfeldislóg hjá undanfarnu samgongu. Jarðfeingi heldur *margfeldið* vera ov óítøkiligt.

Til 1

Endamálið við lógini er sambært § 1 í uppskotinum *at røkja margfeldið og tær vistfrøðiligu tilgongdirnar í náttúruni*.

Margfeldið í náttúruni er tað sama sum *náttúrumargfeldið*, sum í § 3, nr. 6, verður allýst sum *lívmargfeldi, landslagsmargfeldi og jarðfrøðimargfeldi*. Sostatt fevnir endamálsorðingn í § 1 enn sum áður um bæði lív-, landslags- og jarðfrøðimargfeldi.

Tilmælið verður ikki tikið til eftirtektar.

2. Jarðfeingi sigur, at við tað at 2. kapittul í lógaruppskotinum hjá undanfarna landsstýri er tikin burtur, hvørva ásetingar um dygd, vitanargrundarlag og fyrisitingarmið. Jarðfeingi heldur ikki, at hetta styrkir lógaruppskotið.

Til 2
Á teimum almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið skilst, at sitast skal fyri náttúruverndarlógini samsvarandi somu miðum og meginreglum, sum stóðu í 2. kapitli í lógaruppskotinum hjá undanfarnu samgongu. Miðini og meginreglurnar fáa ikki tvørsektoriellan virknað sum eftir lógaruppskotinum hjá undanfarnu samgongu, men tey fáa framvegis týdning, tá ið sitið verður fyri sjálvari náttúruverndarlógini.

3. Jarðfeingi sóknast eftir reglum um ferðslu uttangarðs.

Til 3
Í eini verndarkunngerð við heimild í náttúruverndarlógini kunnu ásetast reglur um ferðslu í verndarøkinum.

4. Jarðfeingi heldur tað vera ein trupulleika, at lendisspell og jarðriv (erosión) ikki verða nevnd í lógaruppskotinum. Eisini verður víst á, at skaði í løtuni stendst av, at nógv hagagrót verður tikið til grótgarðar og aðra grótlaðing. Jarðfeingi vísir á, at tá ið ikki verður ansað eftir, at slík tøka er burðardygg, er vandi fyri, at hon veksur munandi um erosiónina.

Til 4
Sambært endamálsásetingini í § 1 er endamálið við lógini at røkja margfeldið í náttúruni, t.e. m.a. landslags- og jarðfrøðimargfeldið. Sambært teimum almennu viðmerkingunum skal sitast fyri lógini samsvarandi m.a. einum røktarmiði fyri náttúrusløg og vistskipanir, sum ásetur, at miðast skal eftir at røkja margfeldið av náttúrusløgum. Margfeldið av náttúrusløgum fevnir sambært § 3, nr. 7, eisini um landslags- og jarðfrøðimargfeldi. At erosión hóttir slíkt margfeldi, kann vera ein grund til at brúka verndaramboð í lógini.

Fyrilitsskyldan eftir § 4 í lógaruppskotinum áleggur øllum eina skyldu at fara fram við fyriliti og gera tað, sum rímiligt er, til, at náttúrumargfeldið ikki verður fyri skaða. Sambært teimum serligu viðmerkingunum til § 4 skilst innihaldið í fyrilitsskylduni m.a. á røktarmiðunum fyri ávikavist sløg og náttúrusløg/vistskipanir, sum nevnd verða undir pkt. 1.4 í teimum almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið, umframt at samsvar kann vera ímillum meginreglurnar, sum nevndar verða undir pkt. 1.4, og tað, sum verður mett at vera framferð við fyriliti.

Veldur tøka av gróti/mineralum náttúrumargfeldinum skaða í ósamsvari við røktarmiðið fyri náttúrusløg og vistskipanir, sum ásetur, at miðast skal eftir at røkja margfeldið av náttúrusløgum í

teimum natúrligu útbreiðsluøkjunum, kann hon vera brot á fyrilitsskylduna eftir § 4, annaðhvørt hon fer fram uttan ella við loyvi frá jarðareigaranum.

Verða verndarøkir skipað eftir 4. kapitli, kunnu í verndarkunngerðini vera ásetingar um tøku gróti/mineralum, um tað styðjar upp undir tað ítøkiliga verndarendamálið.

Sambært § 3, stk. 1, í náttúrufriðingarlógini skal burturtøka ella nýtsla av m.a. gróti fara fram, so at tað skemmir nattúruna sum minst og ger sum minst av skaða, og sambært § 3, stk. 2, kann náttúrufriðingarnevndin seta forboð fyri burturtøku ella nýtslu, um vandi er fyri, at sermerkt landslag ella leivdir av sermerktari náttúru fara fyri skeytið.

5. Jarðfeingi vísir á, at sambært § 21 kunnu sum landslagsverndarøkir verjast økir, sum hava vistfrøðiligt, mentanarligt og upplivingarligt virði ella eru samleikaskapandi, og sigur seg sakna landslags- og jarðfrøðivirðir í hesum sambandinum, t.e. á enskum m.a. *geoheritage*.

Til 5
§ 18, stk. 1, ásetur tey yvirskipaðu økisverndarmiðini, sum verndarøkir eftir 4. kapitli skulu gera sítt til at verja. Tað fyrsta av hesum miðunum snýr seg um at verja *fjølbroytnið av náttúrusløgum og landsløgum*. Fjølbroytnið av náttúrusløgum fevnir sum nevnt eisini um landslags- og jarðfrøðimargfeldi, sbr. § 3, nr. 7, og tí *kunnu* landslags- og jarðfrøðivirðir eisini verjast í sambandi við økisvernd eftir 4. kapitli, sbr. eisini endamálsásetingina í § 1, sbr. § 3, nr. 6.

6. Jarðfeingi mælir til at áseta fráboðanarskyldu í lógini, so at t.d. byggiharrar, sum koma fram á slíkt, sum hevur týdning fyri náttúrumargfeldi, fáa skyldu at boða náttúrufyrisitingini frá, so at hon fær tikið støðu til, um kanningar skulu setast í verk.

Til 6
Mett verður, at skal ein serlig fráboðanarskylda ásetast fyri tann, sum í sambandi við bygging verður varugur við okkurt, sum hevur týdning fyri náttúrumargfeldið, eigur tað vera gjørt í lendis-/byggilóggávu.

Hinvegin geldur tann almenna fyrilitsskyldan eftir § 4 í lógaruppskotinum fyri øll, og hon fevnir m.a. um eina skyldu at royna at kunna seg við, hvørji náttúruvirðir ið kunnu fáa skaða, og eina skyldu at gera tað, sum rímiligt er, til, at tað slepst undan, at náttúrumargfeldið verður fyri skaða.

Eftir § 36, stk. 2, hevur tann, sum hevur ábyrgdina av skaða á náttúrumargfeldið ella vanda fyri álvarsligum skaða av slíkum slag orsakað av virksemi, sum er fevnt av ásetingunum í lógini, skyldu til at boða landsstýrismanninum frá.

7. Jarðfeingi vísir á, at 2. kapittul í uppskotinum til náttúruverndarlóg nevnir ymiskt um tøku av dýrum og plantum, og heldur, at tað hevði verið natúrligt eisini at nevnt tøku av steinsløgum/mineralum í tí sambandi.

Til 7
2. kapittul í uppskotinum til náttúruverndarlóg snýr seg bara um sløg (*species*), t.e. livandi lívverur, sbr. § 3, nr. 9.

Uppskotið til náttúruverndarlóg hevur ikki ásetingar um tøku av gróti/mineralum, men grót/mineral eru fevnd av hugtakinum náttúrumargfeldi, sum í § 3, nr. 6, verður allýst sum lívmargfeldi, landslagsmargfeldi og jarðfrøðimargfeldi, sum ikki í høvuðsheitum er úrslit av mannaávirkan.

Fyrilitsskyldan eftir § 4 í lógaruppskotinum áleggur øllum eina skyldu at fara fram við fyriliti og gera tað, sum rímiligt er, til, at náttúrumargfeldið ikki verður fyri skaða. Sambært teimum serligu viðmerkingunum til § 4 skilst innihaldið í fyrilitsskylduni m.a. á røktarmiðunum fyri ávikavist sløg og náttúrusløg/vistskipanir, sum nevnd verða undir pkt. 1.4 í teimum almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið, umframt at samsvar kann vera ímillum meginreglurnar, sum nevndar verða undir pkt. 1.4, og tað, sum verður mett at vera framferð við fyriliti.

Veldur tøka av gróti/mineralum náttúrumargfeldinum skaða í ósamsvari við røktarmiðið fyri náttúrusløg og vistskipanir, sum ásetur, at miðast skal eftir at røkja margfeldið av náttúrusløgum í teimum natúrligu útbreiðsluøkjunum, kann hon vera brot á fyrilitsskylduna eftir § 4, annaðhvørt hon fer fram uttan ella við loyvi frá jarðareigaranum. Fyrilitsskyldan hevur størstan týdning fyri atburð og virksemi, sum ikki eru fevnd av reglum. Eru reglur ásettar fyri, hvussu fyrilit skal havast fyri náttúruvirðunum, er fyrilitsskyldan vanliga lokin, um farið verður fram í samsvari við reglurnar. Hetta geldur í enn størri mun, tá ið talan er um virksemi, sum ein almennur myndugleiki hevur givið loyvi til.

Verða verndarøkir skipað eftir 4. kapitli, kunnu í verndarkunngerðini vera ásetingar um tøku gróti/mineralum, um tað styðjar upp undir tað ítøkiliga verndarendamálið.

Sambært § 3, stk. 1, í náttúrufriðingarlógini skal burturtøka ella nýtsla av m.a. gróti fara fram, so at tað skemmir nattúruna sum minst og ger sum minst av skaða, og sambært § 3, stk. 2, kann náttúrufriðingarnevndin seta forboð fyri burturtøku ella nýtslu, um vandi er fyri, at sermerkt landslag ella leivdir av sermerktari náttúru fara fyri skeytið.

SEV
SEV hevur ongar viðmerkingar til lógaruppskotið.

Umhvørvisstovan
1. Umhvørvisstovan heldur tað vera óheppið, at ásetingin í lógaruppskotinum hjá undanfarnu samgongu, um at allir almennir myndugleikar skuldu hava nakrar meginreglur sum leiðreglur, tá ið teir tóku avgerðir við ávirkan á náttúrumargfeldi, ikki er við í uppskotinum.

Umhvørvisstovan vísir á, at hetta, at fyrilit fyri náttúru og umhvørvi skulu vera ein integreraður partur av øllum avgerðum hjá almennum myndugleikum, m.a. er ásett í art. 6 í sáttmálanum um lívmargfeldi, sum Føroyar hava tikið undir við.

Til 1
Tikið verður ikki undir við at varðveita tann tvørsektoriella 2. kapittul í uppskotinum hjá undanfarna landsstýri, sum álegði øllum myndugleikum, sum taka avgerðir við ávirkan á náttúrumargfeldi, serligar fyrisitingarligar skyldur.

Skulu slík krøv setast, verður mælt til at áseta tey í geiralóggávuni sambært vanligum føroyskum lóggávusiði.

2. Umhvørvisstovan heldur tað vera óheppið, at ásetingin í uppskotinum hjá undanfarna landsstýri, um at øll veiða eftir geiralóggávuni skal vera burðardygg, er tikin úr uppskotinum.

Til 2
Tikið verður ikki undir við tvørsektoriellum burðardygarkrøvum í náttúruverndarlóggávuni.

Skulu slík krøv setast, verður mælt til at áseta tey í geiralóggávuni sambært vanligum føroyskum lóggávusiði.

3. Umhvørvisstovan mælir til at seta eina áseting um bann fyri at taka m.a. grót og tinnur úr náttúruni í lógaruppskotið ella at heimila landsstýrismanninum at áseta reglur hesum viðvíkjandi.

Til 3
Uppskotið til náttúruverndarlóg hevur ikki ásetingar um tøku av gróti/mineralum, men grót/mineral kunnu verða fevnd av hugtakinum náttúrumargfeldi, sum í § 3, nr. 6, verður allýst sum lívmargfeldi, landslagsmargfeldi og jarðfrøðimargfeldi, sum ikki í høvuðsheitum er úrslit av mannaávirkan.

Fyrilitsskyldan eftir § 4 í lógaruppskotinum áleggur øllum eina skyldu at fara fram við fyriliti og gera tað, sum rímiligt er, til, at náttúrumargfeldið ikki verður fyri skaða. Sambært teimum serligu viðmerkingunum til § 4 skilst innihaldið í fyrilitsskylduni m.a. á røktarmiðunum fyri ávikavist sløg og náttúrusløg og vistskipanir, sum nevnd verða undir pkt. 1.4 í teimum almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið, umframt at samsvar kann vera ímillum meginreglurnar, sum nevndar verða undir pkt. 1.4, og tað, sum verður mett at vera framferð við fyriliti.

Veldur tøka av gróti/mineralum náttúrumargfeldinum skaða í ósamsvari við røktarmiðið fyri náttúrusløg og vistskipanir, sum ásetur, at miðast skal eftir at røkja margfeldið av náttúrusløgum í teimum natúrligu útbreiðsluøkjunum, kann hon vera brot á fyrilitsskylduna eftir § 4, annaðhvørt hon fer fram uttan ella við loyvi frá jarðareigaranum. Fyrilitsskyldan hevur størstan týdning fyri atburð og virksemi, sum ikki eru fevnd av reglum. Eru reglur ásettar fyri, hvussu fyrilit skal havast fyri náttúruvirðunum, er fyrilitsskyldan vanliga lokin, um farið verður fram í samsvari við reglurnar. Hetta geldur í enn størri mun, tá ið talan er um virksemi, sum almennur myndugleiki hevur givið loyvi til.

Verða verndarøkir skipað eftir 4. kapitli, kunnu í verndarkunngerðini vera ásetingar um tøku gróti/mineralum, um tað styðjar upp undir tað ítøkiliga verndarendamálið.

Sambært § 3, stk. 1, í náttúrufriðingarlógini skal burturtøka ella nýtsla av m.a. gróti fara fram, so at tað skemmir nattúruna sum minst og ger sum minst av skaða, og sambært § 3, stk. 2, kann náttúrufriðingarnevndin seta forboð fyri burturtøku ella nýtslu, um vandi er fyri, at sermerkt landslag ella leivdir av sermerktari náttúru fara fyri skeytið.

4. Umhvørvisstovan mælir til at seta ásetingarnar í uppskotinum hjá undanfarna landsstýri um ílegutilfar inn aftur í uppskotið.

Til 4

Kapittulin um ílegutilfar er strikaður, í fyrra lagi tí at tað er ivasamt, júst hvat tørvur er á slíkum reglum, og í seinna lagi tí at mett verður, at slíkar reglur kunnu ásetast í lóg fyri seg, sum gjørt er í t.d. Danmark, sbr. Lov om udbyttedeling ved anvendelse af genetiske ressourcer.

5. Viðvíkjandi § 7, stk. 1, mælir Umhvørvisstovan til, at ásetingin eisini fevnir um onnur dýr sum eitt nú froskar, sum fólk hava slept út í náttúruna, og sum tykjast at kunna nørast har.

Til 5
Ásetingin verður tillagað, so at *villum súgdýrum og fugli* verður broytt til *villum ryggdýrum.*

Fremmandar lívverur eru annars fyrst og fremst fevndar av 3. kapitli. Sambært § 15, stk. 1, nr. 1, er ongum loyvt uttan við heimild í § 16 ella við loyvi frá landsstýrismanninum at seta út lívverur av sløgum og undirsløgum, sum ikki finnast natúrliga í Føroyum.

Sambært § 38, stk. 1, í lógaruppskotinum kann landsstýrismaðurin áleggja tí, sum hevur ábyrgdina, at fáa aftur í rættlag ella steðga viðurskiftum, sum ikki eru í samsvari við løgtingslógina ella avgerð við heimild í løgtingslógini. Sambært § 38, stk. 2, skal tann, sum við at gera ímóti løgtingslógini ella avgerð við heimild í løgtingslógini er atvold til vanda fyri, at náttúrumargfeldið verður fyri skaða, seta tiltøk í verk til at forða fyri, at tað hendir. Er náttúrumargfeldið longu skatt, fevnir skyldan um at forða fyri, at viðurskiftini versna uppaftur meira, og, um tað er gjørligt, við m.a. upptøku og øðrum hóskandi tiltøkum at fáa náttúrumargfeldið aftur í sama stand sum frammanundan.

Lýðir tann, sum hevur ábyrgdina, ikki eini boð, sum bera í sær álegging sum ta, sum nevnd verður í § 38, stk. 1, kann landsstýrismaðurin sambært § 40, stk. 1, bera so í bandi, at tiltøkini verða sett í verk. Landsstýrismaðurin kann eisini bera so í bandi, at tiltøkini verða sett í verk, tá ið tað hevur skund til at verja náttúrumargfeldið ella tað ikki ber til at siga, hvør ið hevur ábyrgdina. Sambært § 40, stk. 2, kann verða álagt tí, sum hevur ábyrgdina, at bera útreiðslurnar av tiltøkum eftir § 40, stk. 1.

Tilmælið verður tikið til eftirtektar.

6. Viðvíkjandi § 15, stk. 1, nr. 2, mælir Umhvørvisstovan til, at ásetingin eisini skal fevna um paddur.

Til 6
Har ið § 15, stk. 1, nr. 1, setur forboð fyri útseting av øllum lívverum, sum ikki finnast natúrliga í Føroyum, snýr ásetingin í § 15, stk. 1, nr. 2, seg um útseting av sløgum, undirsløgum ella stovnum, sum, hóast tey finnast natúrliga í Føroyum, ikki finnast í ávísum *økjum* í Føroyum. Av tí at paddur ikki finnast natúrliga í Føroyum, eru tær fevndar av tí yvirskipaðu ásetingini í § 15, stk. 1, nr. 1, og tí er ikki viðkomandi at nevna tær í § 15, stk. 1, nr. 2.

Tilmælið verður ikki tikið til eftirtektar.

7. Viðvíkjandi uppskotinum til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um náttúrufriðing mælir Umhvørvisstovan til, at friðingarnevndirnar verða avtiknar og lógin løgd til ein fyrisitingarstovn við neyðugum fakligum førleikum.

Til 7
Partar av náttúrufriðingarlógini verða strikaðir, men landsstýrið tekur ikki undir við at avtaka friðingarnevndirnar.

Visit Faroe Islands

1. Visit Faroe Islands heldur, at lógaruppskotið átti at forbjóðað ATV-ferðslu uttan fyri bøgarðarnar og at havt ásetingar, sum forðaðu fyri, at grót, plantur o.a. verða tikin úr náttúruni.

Til 1

Bæði grót og plantur eru fevnd av hugtakinum náttúrumargfeldi, sum í § 3, nr. 6, í uppskotinum til náttúruverndarlóg verður allýst sum lívmargfeldi, landslagsmargfeldi, jarðfrøðimargfeldi, sum ikki í høvuðsheitum er úrslit av mannaávirkan.

Fyrilitsskyldan eftir § 4 í lógaruppskotinum áleggur øllum eina skyldu at fara fram við fyriliti og gera tað, sum rímiligt er, til, at náttúrumargfeldið ikki verður fyri skaða. Sambært teimum serligu viðmerkingunum til § 4 skilst innihaldið í fyrilitsskylduni m.a. á røktarmiðunum fyri ávikavist sløg og náttúrusløg og vistskipanir, sum nevnd verða undir pkt. 1.4 í teimum almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið, umframt at samsvar kann vera ímillum meginreglurnar, sum nevndar verða undir pkt. 1.4, og tað, sum verður mett at vera framferð við fyriliti.

Veldur ATV-koyring ella tøka av plantum og gróti skaða í ósamsvari við røktarmiðini, sum nevnd verða undir pkt. 1.4 í teimum almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið, kann hon vera brot á fyrilitsskylduna eftir § 4.

Verða verndarøkir skipað eftir 4. kapitli, kunnu í verndarkunngerðini vera ásetingar um ferðslu og um tøku av plantum og gróti, um tað styðjar upp undir tað ítøkiliga verndarendamálið.

Sambært § 3, stk. 1, í náttúrufriðingarlógini skal burturtøka ella nýtsla av m.a. gróti fara fram, so at tað skemmir nattúruna sum minst og ger sum minst av skaða, og sambært § 3, stk. 2, kann náttúrufriðingarnevndin seta forboð fyri burturtøku ella nýtslu, um vandi er fyri, at sermerkt landslag ella leivdir av sermerktari náttúru fara fyri skeytið.

2. Visit Faroe Islands mælir til, at avgerðir um at friða í størri mun verða lagdar til fakmyndugleikan, so at tað verða sakligar grundgevingar og kanningar heldur enn politisk fyrilit, sum gera av, nær ið friðingar ella onnur verndartiltøk verða sett í verk.

Til 2

Høvuðsendamálið við uppskotinum til løgtingslóg um náttúruvernd er at dagføra lóggávuna og skipa eina náttúrufyrisiting undir landsstýrismanninum í samsvari við meginregluna eftir § 1 í stýriskipan Føroya um, at tað útinnandi valdið er hjá landsstýrinum.

Tað verður tann fakliga náttúrufyrisitingin undir landsstýrismanninum, sum fer at skipa og sita fyri verndartiltøkum í verki, men landsstýrið tekur ikki undir við at leggja friðingarheimildirnar beinleiðis til náttúrufyrisitingina. Kunngerðarheimildirnar liggja hjá landsstýrismanninum, sum hevur ábyrgdina av málsøkjunum.

Tilmælið verður ikki tikið til eftirtektar.

3. Visit Faroe Islands mælir til at strika eitt brot í teimum serligu viðmerkingunum til § 20, har ið sagt verður, at *ferðavinnustøðir* ikki skulu vera inni í tjóðgørðum. Sagt verður, at uttanlands er vanligt, at sokallað *visitor centres* eru at finna inni í tjóðgørðum, og at slíkar støðir, sum vanliga verða riknar av

náttúrumyndugleikanum, kunnu verða brúktar sum portur inn í tjóðgarðin, har ið til ber at fáa kunning og keypa útferð við ferðaleiðara, kort yvir økið o.t.

Til 3
Við *ferðavinnustøðum* meinast støð ella bygningar við útbúnaði til ferðavinnuendamál.

Útgangsstøðið eftir § 20, stk. 2, er, at í einum tjóðgarði skal eingin varandi ávirkan á náttúruumhvørvið fara fram. Hinvegin nýtist ávirkan, sum ikki er varandi, ikki at vera forboðin.

Sum nevnt verður í teimum serligu viðmerkingunum, skal ásetingin ikki fatast sum heilt óvikilig. Sumt virksemi kann fara fram, men tær serligu viðmerkingarnar gera greitt, at tað skal vera forboðið at reisa nýggjar bygningar, og at ferðavinnustøðir ikki skulu vera inni í einum tjóðgarði. Hetta er sama skipan sum í Norra, og einki er til hindurs fyri at hava eina gestastøð (*visitor centre*) sum portur inn í ein tjóðgarð.

Tilmælið verður ikki tikið til eftirtektar.

Uttanríkis- og mentamálaráðið
1. Uttanríkis- og mentamálaráðið vísir á, at sambært galdandi náttúrufriðingarlóg eru ávikavist leiðarin á natúrsavninum og landsfornfrøðingurin, sum báðir eru í starvi á Tjóðsavninum, limir í yvirfriðingarnevndini, og sigur, at teir har umboða sama fakliga førleika við atliti at at varðveita føroyska náttúru, sum ætlanin nú er at menna á Umhvørvisstovuni. Eisini sigur Uttanríkis- og mentamálaráðið, at tá ið leiðarin á natúrsavninum og landsfornfrøðingurin eru limir í yvirfriðingarnevndini, er tað, tí at stovnurin er fakligur myndugleiki við atliti at varðveiting av føroyskari náttúru og mentanararvi.

Til 1
Førleikin, sum skal mennast á Umhvørvisstovuni, er fyrst og fremst av náttúrufyrisitingarligum slag. Landsstýrismaðurin í umhvørvismálum hevur tó eisini eftirlit við, hvørjum standi náttúran er í, sbr. eisini § 34, stk. 1, í uppskotinum til náttúruverndarlóg. Til slíkt eftirlits- og verndarendamál krevst náttúrukortlegging.

Tað, sum finst av vitan um føroyska náttúru, liggur í dag spjatt á ymsum stovnum, og tí fer at krevjast samstarv við viðkomandi náttúruskjalfestandi fak- og vitanarstovnar til at útvega vitanargrundarlag til fyrisiting eftir tí nýggju náttúruverndarlógini. Uppskotið til náttúruverndarlóg nágreinar ikki, hvussu slíkt samstarv skal leggjast til rættis, men staðfestir, at skipað náttúruskráseting til at fáa greiðu á standinum, sum náttúran er í, er ein fyritreyt fyri munadyggum verndartiltøkum eftir lógaruppskotinum. Skipað náttúruskráseting til hetta endamálið finst ikki í dag, hóast ymsir stovnar hava skjalfest ymiskt til endamál á egnum virkisøki.

Hóast fólk við viðkomandi náttúruverndarførleikum starvast á Tjóðsavninum, so er virkisøkið sambært løgtingslóg nr. 26 frá 17. august 1955 um Føroya Náttúrugripasavn, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 66 frá 10. mai 2000, at *savna*, *varðveita* og *sýna fram náttúrugripir*, sum lýsa føroyska náttúru, og at *savna*, *varðveita* og *handfara náttúruvísindaligt tilfar*. Talan tykist fyrst og fremst at vera um náttúrusøguligar og musealar uppgávur, sum landsstýrismaðurin í mentamálum í dag varðar

av, heldur enn náttúrufyrisiting og skjalfesting av náttúrumargfeldi til náttúruverndarendamál, sum landsstýrismaðurin í náttúrumálum varðar av.

Landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum varðar av náttúrumálum og náttúrvernd, og høvuðsendamálið við uppskotinum til løgtingslóg um náttúruvernd er at dagføra lóggávuna og skipa eina náttúrufyrisiting undir landsstýrismanninum í samsvari við meginregluna eftir § 1 í stýriskipan Føroya.

Landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum varðar frammanundan av galdandi løgtingslóg um náttúrufriðing, sum eins og lógin um Føroya Náttúrugripasavn stavar frá tíðini við kollegialum landsstýri, men tær endaligu fyrisitingarligu heimildirnar eftir náttúrufriðingarlógini liggja í dag hjá sjálvstøðugum náttúrufriðingarnevndum og yvirfriðingarnevndini, sum eru leysar av landsstýrismanninum, sum varðar av lógarøkinum. Tað, at fólk við ávísum stovnstilknýti manna Yvirfriðingarnevndina, ger ikki viðkomandi *stovnar* til myndugleikar við atliti at náttúruvernd.

Í 2001 setti táverandi landsstýrismaður í umhvørvismálum ein arbeiðsbólk at lýsa støðuna á umhvørvis- og náttúruverndarøkinum við støði í verandi umsiting og galdandi lóggávu og at lýsa tørvin á broytingum á økinum. Í álitinum hjá arbeiðsbólkinum varð mælt til at smíða eina *tíðarhóskandi náttúruverndarlóg, har landsstýrismaðurin hevur endaligu ábyrgdina*. Arbeiðsbólkurin staðfesti m.a., at *[n]áttúrufriðingarlógin nøktar als ikki tann tørv, sum er á náttúrufyrisiting í dag*. Arbeiðsbólkurin taldi umboð fyri Føroya Náttúrugripasavn og Yvirfriðingarnevndina.

Í 2011 bað landsstýrismaðurin í innlendismálum Umhvørvisstovuna um at lýsa fyrisitingina á náttúruøkinum og skjóta upp nútímansgerð av náttúrufyrisitingini. Verkætlanin varð fíggjað av játtanini til umhvørvisverndartiltøk. Tilmælið sambært frágreiðingini var m.a. at leggja fyrisitingina av náttúruvernd til ein stovn undir landsstýrismanninum við fyrisitingarligum royndum og fakligum førleikum og at avtaka skipanina við friðingarnevndum.

Síðan aldaskiftið hevur í fleiri umførum verið arbeitt við uppskotum til nýggja náttúruverndarlóggávu og at skipa eina náttúrufyrisiting undir landsstýrismanninum.

Í viðmerkingunum til galdandi náttúrufriðingarlóg frá 1970, sum er skrivað í 1950'unum, verður sagt um markamótið millum náttúruverndarfyrilit og søgulig fyrilit:

> DL (danska naturfredningsloven, red.) S 2 indeholder ret specificerede regler om fredning af «jordfaste fortidsminder». Tilsvarende regler findes imidlertid i lagtl. nr. 19 af 16.9. 1948 om fredning af fortidsminder og bygninger. Man har overvejet, hvorvidt man skulle foreslå bestemmelserne i nævnte S 1 optaget i nærværende udkast, men har dog fundet det rettest at lade kompetancen til fredning af fortidsminder forblive hos det i lagtingslovens S 3, stk. 2 omhandlede oldsagnsudvalg, der har en særlig sagkundskab på dette område.
>
> Der vil kunne forekomme grænsetilfælde, hvor det er tvivlsomt, om fredning bør ske efter lagtingslovens S 1 eller af historiske grunde efter nærværende udkast S 6 nr. 1. I sådanne tilfælde bør vedkommende fredningsnævn forhandle med oldsagsudvalget om fredningens gennemførelse.

Um samansetingina av yvirfriðingarnevndini verður sagt í viðmerkingunum til galdandi náttúrufriðingarlóg:

> Det færøske overfredningsnævn er foreslået sammensat af en dommer, to videnskabsmænd (en naturhistoriker og en historiker) og 2 lagtingsvalgte medlemmer.

Á hesum skilst, at landsfornfrøðingurin og leiðarin av natúrsavninum hava skulað borgað fyri vísindaligari fakligheit heldur enn ávísum stovnstilknýti. Tað hevur sínar søguligu orsøkir, at yvirfriðingarnevndin sambært náttúrufriðingarlógini frá 1970 er mannað, sum hon er, men hetta fær illa verið stýrandi fyri, hvussu avvarðandi landsstýrismaður skipar eina nýggja náttúrufyrisiting í 2021 í samsvari við galdandi málsøkjabýti.

Tó skal verða víst á, at sambært § 32 í uppskotinum til náttúruverndarlóg *kann* landsstýrismaðurin heimila landsstovnum, sum hann ikki sjálvur varðar av, at útinna sínar heimildir eftir lógini.

2. Uttanríkis- og mentamálaráðið sigur, at tað er ikki skynsamt at býta náttúrufyrisitingina sundur í tvær skipanir og at skipa náttúrufriðing og náttúruvernd í tveimum ymsum løgtingslógum.

Sagt verður, at á henda hátt verður faklig og fyrisitingarlig vitan spjadd út á enn fleiri stovnar heldur enn at verða savnað hjá einum og sama myndugleika.

Til 2

Við uppskotinum til náttúruverndarlóg verða náttúrufriðing og náttúruvernd skipað eftir eini og somu lóg, nevniliga náttúruverndarlógini.

Sambært uppskotinum til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um náttúrufriðing varðveita friðingarnevndirnar eftir náttúrufriðingarlógini bara heimildirnar at geva loyvi til bygging í ávísum økjum, sbr. § 2, stk. 1-2, og til arbeiðir o.a., sum kann broyta sermerkt landslag munandi ella týna leivdir av sermerktari náttúru, sbr. §§ 3-4. Av tí at hesar ásetingarnar í náttúrufriðingarlógini snúgva sum lendisbrúk, verður mett, at talan meira er um lendislóggávu enn náttúruverndarlóggávu. Nevnast kann, at í Norra eru líknandi ásetingar um bygging, sum fyrr vóru ásetta í norskari náttúrufriðingarlóg, í dag ásettar í lov om planlegging og byggesaksbehandling. Orsøkin til, at friðingarnevndirnar ikki verða avtiknar, er, at undirtøka ikki er fyri tí.

3. Uttanríkis- og mentamálaráðið vil vera við, at broytingin í náttúrufriðingarlógini hevur við sær, at friðingar verða tiknar úr lógini, uttan at samsvarandi vernd verður sett inn í náttúruverndarlógina, og at náttúran samanumtikið verður verri vard enn eftir galdandi lóggávu.

Til 3

Mett verður, at tær fjøltáttaðu verndarásetingarnar í nýggju náttúruverndarlógini og ein náttúrufyrisiting undir landsstýrismanninum fara slóða fyri betri vernd enn skipanin eftir galdandi náttúrufriðingarlóg. Seinasta galdandi friðing eftir náttúrufriðingarlógini varð lýst í 1988, t.e. fyri 33 árum síðan.

4. Uttanríkis- og mentamálaráðið heldur tað kunna skaða álitið á skipanina, at náttúrufriðingin verður flutt frá eini annars royndari og sakkønari nevnd, sum er dómstólslíknandi og liggur uttan fyri fyrisitingina, til politiska myndugleikan, sum eisini situr fyri ferðavinnu, landbúnaði og orku- og umhvørvismálum, og til Umhvørvisstovuna, sum umsitur orku- og umhvørvismál.

Til 4

Landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum varðar av náttúrumálum og undir hesum náttúrufriðingarmálum, sbr. § 39, stk. 1, og § 40, nr. 7, í fráboðan nr. 128 frá 16. september 2019 um býti av málsøkjum landsstýrisins millum landsstýrismenninar, sum seinast broytt við fráboðan 116 frá 20. juli 2021.

5. Uttanríkis- og mentamálaráðið vísir á, at Tjóðsavnið umsitur ta antikvarisku serskipanina fyri Koltur, sum ætlanir eru um at skipa sum Tjóðgarð, og sigur, at sambært uppskotinum til náttúruverndarlóg verður skipanin løgd til Umhvørvisstovuna at umsita.

Til 5

Serskipanir á øðrum heimildargrundarlagi enn náttúruverndarlógini verða ikki (av sær sjálvum) lagdar til náttúrufyrisitingina at umsita.

6. Uttanríkis- og mentamálaráðið sigur, at tá ið frágreiðingar og árinskanningar skulu gerast, er tað í stóran mun Tjóðsavnið, sum stendur fyri arbeiðinum.

Til 6
Galdandi krøv um árinskanningar stava úr lóggávu, sum landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum varðar av. Bæði almenn og privat kunnu gera árinskanningar.

7. Uttanríkis- og mentamálaráðið sigur tað vera *problematiskt*, at Umhvørvisstovan, sum umsitur umhvørvis- og orkumál, sum kunnu vera í andsøgn við náttúruverndarfyrilit, eisini skal umsita náttúruvernd.

Til 7
Landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum skipar síni málsøkir.

8. Uttanríkis- og mentamálaráðið sigur, at verður landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum kærumyndugleiki, kann landsstýrismaðurin, sum umsitur ferðavinnu, landbúnað og umhvørvis- og orkumál lættliga koma í ta støðu, at hann skal taka avgerð í kærumálum, har ið sami stovnur og sami landsstýrismaður varða av bæði honum, sum kært verður um, og kæraranum.

Til 8
Kærumyndugleikin verður lagdur til Føroya Kærustovn og ásetingin broytt samsvarandi hesum.

9. Uttanríkis- og mentamálaráðið heldur tað vera áhugamálsstríð, at landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur eftirlit við standinum, sum náttúran er í.

Til 9
Landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum skipar síni málsøkir.

10. Uttanríkis- og mentamálaráðið sigur seg hava ta fatan, fyrisitingarmiðini og krøvini til vitanargrundarlag, sum vóru ásett í 2. kapitli í lógaruppskotinum hjá undanfarna landsstýri um fyrisiting av margfeldinum í nátttúruni, vóru berandi súlur í uppskotinum, við tað at tey vóru grundarlag fyri tulkingum og metingum sambært lógartekstinum.

Til 10

Í samsvari við samgonguskjalið hjá sitandi samgongu er lógaruppskotið hjá undanfarna landsstýri tillagað samsvarandi ynskjum hjá sitandi landsstýri.

Viðvíkjandi fyrisitingarmiðunum og krøvunum til vitanargrundarlag er at siga, at sambært teimum almennu viðmerkingunum til uppskotið til náttúruverndarlóg, skal sitast fyri náttúruverndarlógini samsvarandi somu miðum og meginreglum, sum stóðu í 2. kapitli í lógaruppskotinum hjá undanfarnu samgongu, sbr. pkt. 1.4 í teimum almennu viðmerkingunum.

Tikið verður ikki undir við at varðveita 2. kapittul í uppskotinum hjá undanfarna landsstýri, sum var tvørsektoriellur og álegði *øllum* myndugleikum, sum taka avgerðir við ávirkan á náttúrumargfeldi, serligar fyrisitingarligar skyldur. Skulu slík krøv setast, verður mælt til at áseta tey í geiralóggávuni sambært vanligum føroyskum lóggávusiði.

11. Uttanríkis- og mentamálaráðið skjýtur upp, at eitt nú Tjóðsavnið, náttúruverndarfelagsskapir og friðingarnevndir fáa lógartryggjaðan ummælis- og kærurætt, áðrenn avgerðir verða tiknar, og kunnu krevja steðgandi virknað, um avgerðarmyndugleikin ikki virðir ummælis- og kærurættin.

Til 11
Enn hava Føroyar ikki tikið undir við Árhus-sáttmálanum frá 1998 um atgongd at upplýsingum, almenna luttøku í avgerðartilgongdum umframt atgongd at kæru- og rættaravgerðum á umhvørvisøkinum. Tað hevur verið mett at vera ov langrøkið til føroysk viðurskiftir.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið verður dentur lagdur á hetta at spyrja allar viðkomandi áhugapartar til ráðs, sbr. m.a. tær serligu viðmerkingarnar til § 18:

> Tá ið farið verður undir verndararbeiði eftir kapitli 4, eigur frá byrjan at verða miðað eftir góðum samstarvi við jarðareigarar, rættindahavarar, ávirkað vinnuáhugamál, umboð fyri fólk á staðnum, kommununa og aðrar viðkomandi myndugleikar. Vil myndugleikin taka onnur við í málsviðgerðina, t.d. serliga ávirkaðar brúkarar, er eisini høvi til tað. Í hvønn mun brúkararnir eiga at verða tiknir við í hetta arbeiðið, veldst um tilknýtið, sum teir hava til økið, sum talan er um. Í sambandi við málsfyrireikingina eiga tey ymisku áhugamálini at verða vigað neyvt upp ímóti hvørjum øðrum.
>
> Sostatt eigur myndugleikin at miða eftir at fáa í lag eina málsviðgerð, har ið øll, sum ávirkað verða, fáa høvi at taka lut á bestan hátt til at gera greiðu fyri bæði ósamsvarandi og samsvarandi áhugamálum, og hvussu málsviðgerðin skal fara fram.
>
> Verndararbeiði byrjar vanliga við náttúrufakligum skrásetingum av verndarvirðum. Longu á hesum stiginum eigur at miðast eftir at fáa í lag samstarv við jarðareigarar, rættindahavarar og fólk á staðnum. Samstarvið kann vera av heilt praktiskum slag og kann t.d. snúgva seg um atgongd at ognunum ella staðbundnan kunnleika.
>
> Málsviðgerðin skal skapa sum mest av greidleika um endamál, verndarvirðir og brúk á staðnum og kunnleika um økismørk og avleiðingar av verndini. Við avleiðingum meinast fyrst og fremst, hvørjar ræðisreglur ið kunnu vera viðkomandi, bæði fyri tann einstaka jarðareigaran ella rættindahavaran og fyri fólkið á staðnum ella almenningin yvirhøvur.
>
> Myndugleikin eigur at skipa málsviðgerðina soleiðis, at tær neyðugu upplýsingarnar verða fingnar til vega, eisini tá ið tær mugu fáast frá rættindahavarum og fólki á staðnum. Serlig vitan um, hvat ið er staðbundið brúk av økinum, og hvat ið fólk á staðnum veit frá verndarvirðum í økinum at siga, kann fáast til vega við hoyring á staðnum og fundum við fólkið á staðnum.

Eisini kann nevnast, at sambært § 25 skal verndarætlanin almannakunngerast, áðrenn uppskot til verndarkunngerð verður orðað. Hetta so at allir viðkomandi áhugapartar fáa høvi at siga sína hugsan.

> **§ 25.** Áðrenn uppskot til verndarkunngerð eftir § 19 verður orðað, skal landsstýrismaðurin almannakunngera verndarætlanina við teimum týdningarmestu avleiðingunum, sum økisverndin kann væntast at fáa. Eigarar og rættindahavarar skulu, alt tað er gjørligt, kunnast beinleiðis og fáa rímiliga freist at koma við viðmerkingum til verndarætlanina.

Tilmælið um at geva Tjóðsavninum, náttúruverndarfelagsskapum og friðingarnevndum lógartryggjaðan ummælis- og kærurætt, áðrenn avgerðir verða tiknar, og rætt at krevja steðgandi virknað verður ikki tikið til eftirtektar.

12. Uttanríkis- og mentamálaráðið mælir til at skipa eina kærunevnd í náttúrufriðingarmálum undir Føroya kærustovni.

Til 12
Kærumyndugleikin verður lagdur til Føroya Kærustovn og ásetingin um kæru broytt samsvarandi hesum.

13. Uttanríkis- og mentamálaráðið heldur ásetingarnar um fyrisiting av sløgum í 2. kapitli í lógaruppskotinum leggja størri dent á veiðu, heysting og gagnnýtslu enn náttúruvernd.

Til 13
Tað er ikki rætt, at ásetingarnar í 2. kapitli um veiðu, heysting og aðra tøku ikki snúgva seg um náttúruvernd.

Tá ið talan er um veiðu og tøku av villum dýrum, hanga ásetingarnar um *aðra tøku*, sum landsstýrismaðurin kann loyva eftir § 7, saman við tí nýggja útgangsstøðinum eftir § 6, sum ásetur, at øll veiða og tøka av villum dýrum skal hava heimild í lóg. Veiðuheimildirnar verða ásettar í veiðulóggávu, men § 7 í uppskotinum útvegar heimild til tøku, sum ikki er til gagnnýtslu, tá ið slík heimild ikki er at finna í geiralóggávuni.

14. Uttanríkis- og mentamálaráðið heldur ikki náttúruverndina fáa nóg góðar karmar at virka undir við lógaruppskotinum, bæði tí at 2. kapittul í lógaruppskotinum hjá undanfarna landsstýri er tikin burturúr, og tí at uppskotið er orðað við støði í norskari lóggávu, har ið fyrisitingin er størri í vavi og øðrvísi skipað enn í Føroyum.

Til 14
Tað var nettupp tann tvørsektorielli 2. kapittul í uppskotinum hjá undanfarnu samgongu sum var ein sernorsk uppfinning, og orsøkin til, at hann er tikin burtur úr uppskotinum, er nettupp, at hann ikki verður mettur at hóska til føroysk viðurskiftir í dag.

Talan var um eitt slag av tvørsektoriellari fyrisitingarlóg fyri náttúrufyrisiting, sum í Norra bygdi á drúgva siðvenju við sínámillum virðing millum javnsettar fyrisitingarmyndugleikar og myndugleikasamstarv.

15. Uttanríkis- og mentamálaráðið sigur, at í yvirfriðingarnevndini tryggjar landsfornfrøðingurin nøktandi vitanargrundarlag, og at nøktandi samband er millum varðveiting av náttúru,

mentanarlandslag og fornminnum. Sagt verður, at tá ið økisvernd verður flutt í nýggja lóggávu, hvørvur hetta sambandið.

Til 15
Náttúrufriðingarlógin endurspeglar, at hon varð til í tíðini við kollegialum landsstýri.

Við uppskotinum til náttúruverndarlóg skjýtur landsstýrismaðurin í náttúrumálum upp nýggja lóggávu á sínum málsøki. Verður lóggávan á málsøkinum hjá landsstýrismanninum í uttanríkis- og mentamálum eisini dagførd, ber til at binda neyðugar sloyfur millum lóggávurnar.

Fyrilit fyri mentanarminnum í náttúruni fara tó framvegis at kunna verjast í verndarøkjum eftir náttúruverndarlógini. Tær almennu viðmerkingarnar til lógaruppskotið leggja í tí sambandi dent á tætt samstarv millum náttúrufyrisitingarmyndugleikan og mentanarminnamyndugleikan, og siga slíkt samstarv vera eina fyritreyt, tá ið ræður um fyrisiting og viðgerð í einstøkum málum, sum eru knýtt at mentanarminnum í verndarøkinum.

16. Uttanríkis- og mentamálaráðið sigur at enda, at hóast galdandi náttúrufriðingarlóg hevur síni lýtir, so metir ráðið veruligan vanda vera fyri, at náttúruverndin fer at vikna munandi við uppskotinum til náttúruverndarlóg.

Til 16
Hetta samsvarar ikki við tað, sum alskyns fakfólk í áratíggjur hava víst á, m.a. arbeiðsbólkurin, sum í 2001 varð settur at lýsa støðuna á m.a. náttúruvernarøkinum, og sum m.a. taldi umboð fyri Náttúrugripasavnið og yvrifriðingarnevndina: at náttúrufriðingarlógin als ikki er nøktandi til at verja føroyska náttúru. At seinasta galdandi friðing eftir lógini varð lýst í 1988, bendir heldur ikki á, at náttúrufriðingarlógin og skipanin eftir lógini tryggja munadygga náttúruvernd.

Fundur
Síðan ta almennu hoyringina hava Umhvørvisstovan og Tjóðsavnið saman við avvarðandi stjórnarráðum umrøtt møguleikarnar fyri samstarvi um náttúruvitan, eftir at tann nýggja náttúruverndarlógin er løgd til Umhvørvisstovuna at fyrisita. Stovnarnir eru samstarvshugaðir og síggja fyrimunir í at samstarva um náttúruvitan, hóast virkisøkini eru ymisk. Stovnarnir kunnu eitt nú luta skrásettar dátur sínámillum, teir kunnu samskipa ítøkiligar skrásetingarverkætlanir, og teir kunnu miða eftir at sleppa undan óneyðugum dupultfunktiónum. Stovnarnir hava eisini umrøtt møguleikan at formalisera slíkt samstarv við eini formligari samstarvsavtalu.

Føroya Fuglafrøðifelag
1. Føroya Fuglafrøðifelag heldur hugtakið *fremmand lívvera* vera ógreitt og vísir á, at ikki so sjáldan vitja sløg, serliga fuglur og firvaldar, sum ikki hoyra til nakað slag ella nakran stovn, sum finst natúrliga á staðnum, í Føroyum. Føroya Fuglafrøðifelag heldur tað vera umráðandi at skilja ímillum innræsin sløg/lívverur, sum av ymsum orsøk eru óynskt, og sløg, sum vitja í Føroyum av tilvild.
Til 1
Hugtakið *fremmand lívvera*, sbr. eisini norskt *fremmed organisme*, er nettupp valt, av tí at talan er um eitt yvirhugtak, sum fevnir um *allar* fremmandar lívverur, t.e. bæði tær, sum eru innræsnar, og tær sum ikki eru.

Endamálið við reglunum um fremmandar lívverur er at forða fyri, at lívmargfeldi, sum finst natúrliga í Føroyum, svinnur ella hvørvur, orsakað av at fremmandar lívverur verða innfluttar og útsettar.

Mett verður ikki, at fuglur og firvaldar, sum av natúrligum ávum vitja í Føroyum av tilvild, eru at rokna sum fremmandar lívverur, sum kunnu valda náttúrumargfeldinum skaða í ósamsvari við endamálið við uppskotinum til løgtingslóg um náttúruvernd.

Tilmælið verður ikki tikið til eftirtektar.

2. Føroya Fuglafrøðifelag harmast um, at kapittulin í lógaruppskotinum hjá undanfarnu samgongu um ílegutilfar í náttúruni er strikaður.

Til 2
Kapittulin um ílegutilfar er strikaður, í fyrra lagi tí at tað ikki er heilt greitt, júst hvat tørvur ið er á slíkum reglum, og í seinna lagi tí at mett verður, at slíkar reglur kunnu ásetast í lóg fyri seg, sum gjørt er í t.d. Danmark, sbr. Lov om udbyttedeling ved anvendelse af genetiske ressourcer.

3. Viðvíkjandi § 6, stk. 1, sóknast Føroya Fuglafrøðifelag eftir eini nágreining um, at veiða og tøka ikki skulu hótta stovnin, eins og ásett í stk. 2 um heysting og aðra tøku av villum plantum.

Til 3
Sambært § 6, stk. 1, kann veiða og onnur tøka av dýrum, sum natúrliga liva vill, bara fara fram sambært lóg ella avgerð við heimild í lóg. Henda meginreglan skal tryggja, at øll veiða og tøka av dýrum, sum natúrliga liva vill, fer fram sambært lóg.

Veiða er fevnd viðkomandi veiðilóggávu, men uppskotið hjá undanfarna landsstýri ásetti tvørsektorielt, at veiða bara kundi loyvast, tá ið slagið sambært tí bestu tøku skjalfestingini framleiddi eitt avlop, sum kundi veiðast burðardygt.

Landsstýrið tekur ikki undir við slíkum tvørsektoriellum lóggávuleisti. Skulu slík krøv um burðardygd setast, skulu tey tí setast í geiralóggávuni samsvarandi vanligum føroyskum lóggávusiði.

4. Føroya Fuglafrøðifelag sigur, at punktini, sum nevnd verða undir § 7, stk. 1, ikki fevna um veiðu av sløgum, sum meira ella minni siðbundið hava verið veidd í Føroyum, og at fuglur tí bara er fevndur av fuglaveiðulógini og ikki fær ta eyka verjuna, sum náttúruverndalógin kundi givið honum.

Til 4
§ 7 snýr seg bara um *aðra* tøku enn veiðu til gagnnýtslu.

Havbúnaðarfelagið
1. Viðvíkjandi § 26 heldur Havbúnaðarfelagið tað tykjast øvut, at ein almennur myndugleiki uttan nærri grundgeving skal kunna havna eini umsókn um virksemi í einum øki, tí at ein verndarætlan er almannakunngjørd. Havbúnaðarfelagið sigur, at tað eigur at vera normurin, at ein umsókn um virksemi í økinum kann verða realitetsviðgjørd, uttan so at tað ítøkiliga verður mett, at tað ikki ber til at viðgera hana orsakað av verndarætlanini.

Til 1

Ásetingin skal saman við § 27 forða fyri, at verndarvirðir, sum kunnu geva grundarlag fyri økisvernd eftir 4. kapitli, versna, meðan arbeitt verður við at fyrireika eina verndarkunngerð. Ásetingin hevur serliga til endamáls at steðga óneyðugum lívmargfeldissvinni, meðan greiða verður gjørd fyri ætlaðari økisvernd. § 26 skal tryggja, at alment loyvi ikki verður givið til virksemi í økjum, har ið vernd eftir 4. kapitli verður fyrireikað, uttan so at virksemið ikki hevur nevningarverdan týdning fyri ta ætlaðu verndina.

Ásetingin geldur fyri virksemi, sum krevur loyvi, undantak ella annað slag av góðkenning frá almennum myndugleika, um talan so er um land, kommunu ella aðra fyrisitingarliga eind.

§ 26, stk. 1, 1. pkt. gevur fyrisitingarstovninum heimild at havna umsóknini um loyvi o.a. Ásetingin geldur bæði fyri loyvir, sum verða givin eftir fyrisitingarligari meting, og lógarbundin loyvir (t.d. byggilovi). Umsóknin *kann* havnast *uttan nærri grundgeving*, t.e. uttan nærri málsviðgerð og bara við at vísa til verndararbeiðið og § 26, stk. 1. Hetta merkir ikki, at eingin grundgeving er. Grundgevingin er, at verndarvirðini, sum ætlanin er verja, ikki skulu fara fyri skeytið, áðrenn endalig støða er tikin til verndina, og sambært § 26, stk. 1, krevst eingin *nærri grundgeving* enn tað. 1. pkt. er ikki til hindurs fyri, at ein umsókn kann verða viðgjørd til fulnar, men 2. pkt. er til hindurs fyri, at loyvi kann gevast, sum hindrar verndararbeiðinum.

2. pkt. avmarkar møguleikan at geva loyvi, so at fyrisitingarstovnurin bara kann geva loyvi, um virksemið ikki hevur nevningarverndan týdning fyri verndaruppskotið. Tað kann vera, tí at virksemið bara fer fram í útryðjuni á tí almannakunngjørda verndarøkinum ella í einum parti, sum eftir eini meting ikki verður fevndur av verndarkunngerðini, at talan er um eitt sera lítið inntriv ella virksemi, sum væntandi fer at verða loyvt eftir verndarkunngerðini. Sum nevnt verður í teimum serligu viðmerkingunum til § 26, stk. 1, má fyrisitingarstovnurin, sum hevur í hyggju at geva loyvi til virksemi, leggja spurningin fyri landsstýrismannin, sum varðar av náttúruverndarlógini, uttan so at tað er eyðsæð, at undantak eigur at verða gjørt, sbr. skylduna hjá almennum myndugleikum at upplýsa mál nøktandi, áðrenn avgerð verður tikin (*offisialmeginreglan*). Um týðandi samfelagsáhugamál gera tað neyðugt, *kann* landsstýrismaðurin, sum varðar av náttúruverndarlógini, viðmæla, at loyvi verður givið til virksemið, hóast tað ávirkar verndarvirðini, sbr. § 5.

Almannamálaráðið
Almannamálaráðið hevur ongar viðmerkingar til lógaruppskotið.

Náttúrufriðingarnevndin fyri Eysturoyar sýslu
1. Náttúrufriðingarnevndin fyri Eysturoyar sýslu undrast á undiryvirskriftina í uppskotinum til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um náttúrufriðing, sum sigur uppskotið snúgva seg um avtøku av friðingarnevndum o.a.

Til 1
Undiryvirskriftin er tíverri komin skeivt fyri og verður rættað.

2. Náttúrufriðingarnevndin fyri Eysturoyar sýslu ásannar, at nevndini væntar førleika at viðgera mál um annað enn bygging, vegir, antennur og tílíkt, og sigur tað vera ein lætta, at náttúrufriðingarnevndin við lógaruppskotunum sleppur undan at skula taka støðu til friðingar eftir § 6 í galdandi náttúrufriðingarlóg.

Til 2
Viðmerkingin verður tikin til eftirtektar.

Náttúrufriðingarnevndin fyri Norðoya sýslu
Náttúrufriðingarnevndin fyri Norðoya sýslu hevur í høvuðsheitum somu viðmerkingar sum náttúrufriðingarnevndin fyri Eysturoyar sýslu.

Heilsufrøðiliga starvsstovan (Landsdjóralæknadeildin)
1. Heilsufrøðiliga starvsstovan sigur seg skilja uppskotið til náttúruverndarlóg soleiðis, at landsstýrismaðurin, sum varðar av náttúruverndarlógini, skal loyva øllum innflutningi av lívverum til Føroya, tá ið innflutningur sambært løgtingslóg um innflutning og hald av vandamiklum djórum o.ø. og kunngerð um innflutning av eksotiskum djórum er undantikin. Heilsufrøðiliga starvsstovan sigur seg í sama viðfangi staðiliga vilja mæla frá, at landsstýrismaðurin, sum varðar av náttúruverndarlógini, fer inn um geiran hjá landsdjóralæknanum, sum er hægsti veterineri myndugleiki, tá ið ræður um innflutning av dýrum til Føroya.

Til 1
Tað er *ikki* rætt skilt, at uppskotið til náttúruverndarlóg ásetur, at landsstýrismaðurin, sum varðar av náttúruverndarlógini, tá ið innflutningur, sum er fevndur av løgtingslóg um innflutning og hald av vandamiklum djórum o.ø. og kunngerð um innflutning av eksotiskum djórum er undantikin, *skal* loyva øllum innflutningi av lívverum til Føroya.

Sambært § 14 í lógaruppskotinum *kann* landsstýrismaðurin, sum varðar av náttúruverndarmálum, *til at verja lívmargfeldið* í kunngerð áseta reglur um innflutning av livandi ella lívførum lívverum, og at ávísar lívverur ella bólkar av lívverum bara skulu kunna flytast inn í landið við loyvi frá landsstýrismanninum. Men í teimum serligu viðmerkingunum til § 14 verður vist á, at innflutningur av sonevndum *eksotiskum dýrum* sambært reglum ásettum við heimild í løgtingslóg um innflutning og hald av fremmandum dýrum í útgangsstøðinum er forboðin. Eksotisk dýr fevna sambært hesum reglunum um súgdýr, fugl, skriðdýr, paddur, fisk og ryggleys dýr, *sum ikki natúrliga hoyra heima í føroysku náttúruni*, og Heilsufrøðiliga starvsstovan, sum umsitur lóggávuna, kann bara geva undantaksloyvi, tá ið talan er um dýr, sum ikki kunnu verða føroyskum gróðri og føroyskum dýralívi at skaða, verða tey slept leys í náttúruni. Tann veterineri myndugleikin hevur greitt frá, at venja er fyri strangari fyrisiting við atliti at innflutningi av fremmandum dýrasløgum. Tí verður sagt í viðmerkingunum til uppskotið til náttúruverndarlóg, at fyrilitini fyri lívmargfeldinum er so væl vard eftir galdandi skipan, at tað neyvan verður viðkomandi at krevja loyvi eftir hesi lógini eisini. Hetta avmarkar tó ikki heimildina hjá landsstýrismanninum í náttúrumálum at seta krøv í sambandi við innflutning, *skuldi* tað gjørst neyðugt til at verja lívmargfeldið.

Innflutningur av dýrum er ikki eitt málsøki, sum í sær sjálvum hoyrir heima í ávísum geira. Eins og landsstýrismaðurin í veterinermálum kann áseta krøv til innflutning av veterinum ávum, kann landsstýrismaðurin í náttúruverndarmálum seta krøv til innflutning til at verja lívmargfeldið.

2. Viðvíkjandi endamálsásetingini í § 1 í uppskotinum til náttúruverndarlóg sigur Heilsufrøðiliga starvsstovan, at djórasjúkur mugu og skulu hava avgerandi tyngd, tá ið ræður um tilætlaðan

innflutning av dýrum. Sagt verður, at koma fremmandar sjúkur til landið, kann tað lívfrøðiliga margfeldið skjótt verða í vanda.

Til 2
Landsstýrismaðurin í náttúruverndarmálum skal sambært uppskotinum til náttúruverndarlóg kunna áseta tær innflutningsreglur, sum krevjast til at forða fyri, at lívmargfeldið verður hótt, eins og landsstýrismaðurin í veterinermálum kann áseta tær reglur, sum krevjast til at forða fyri, at lív og heilsa hjá dýrum verða hótt.

§ 17 í uppskotinum til náttúruverndarlóg staðfestir, at eitt loyvi eftir hesi náttúruverndarlógini *ikki* sleppir nøkrum undan møguligum innflutnings- ella útsetingarloyvum, sum krevjast eftir *aðrari* lóggávu. Hetta tí at aðrar lógir kunnu leggja dent á *onnur fyrilit*, sum ikki eru vard eftir náttúruverndarlógini. Á teimum serligu viðmerkingunum til § 17 skilst eisini, at metingar eftir 3. kapitli í náttúruverndarlógini *ikki* skulu fevna um fyrilit fyri lívi og heilsu hjá plantum, dýrum og fólki, sum eru fevnd av *aðrari* lóggávu.

Hóast sami landsstýrismaður í løtuni varðar av báðum, eru náttúruverndarmál og veterinermál hvør sítt máls- og fakøki.

3. Heilsufrøðiliga starvsstovan sigur stóran tørv vera á reglum um innflutning av mold og plantum, men heldur hetta ikki síggjast nóg væl aftur í lógaruppskotinum.

Til 3
Sambært fyrilitskravinum í § 13, stk. 1, í uppskotinum skal tann, sum hevur ábyrgdina, tá ið livandi ella lívførar lívverur verða settar út í umhvørvið, fara fram við fyriliti og, alt tað er gjørligt, royna at forða fyri, at útsetingin fær óhepnar avleiðingar fyri lívmargfeldið. Sambært § 13, stk. 2, skal tann, sum fer undir virksemi ella tiltak, sum kann hava við sær, at livandi ella lívførar lívverur spjaðast ella sleppa út, hagar ið tær ikki liva natúrliga, í rímiligan mun taka stig til at forða fyri, at hetta hendir. § 13, stk. 4, gevur landsstýrismanninum heimild at áseta reglur um virksemi og tiltøk, sum kunnu hava við sær serligan vanda fyri, at lívverur, sum ikki liva natúrliga á einum stað, spjaðast ella ótilætlað sleppa út, og um fráboðanarskylduna eftir § 13, stk. 3. Nærri reglur um fremmandar lívverur verða at áseta í kunngerð.

Til samanberingar kann vísast til norsku kunngerðina um fremmandar lívverur (FOR-2015- 06-19-716). § 24 í norsku kunngerðini snýr seg um krøv um atgerðir móti møguligum vektorum og spjaðingarleiðum hjá fremmandum lívverum og ásetur í samsvari við § 13, stk. 2, í lógaruppskotinum eina skyldu at fremja fyribyrgjandi atgerðir til at forða fyri, at fylgilívverur spjaðast. Plantur, moldklumpar við plantum og bingjur við plantum kunnu t.d. hava skaðiligar fremmandar lívverur við sær, og fyri tey, sum flyta plantur inn, ber kravið um fyribyrgjandi atgerðir eftir norsku kunngerðini tí í sær, at mannagongdir verða settar í verk fyri kanningum til at finna slíkar lívverur. Uppskotið til náttúrumargfeldislóg gevur landsstýrismanninum heimild at áseta slíkar reglur, sbr. § 13, stk. 4.

4. Viðvíkjandi endamálsásetingini í § 1 heldur Heilsufrøðiliga starvsstovan, at tørvur er á at allýsa orðið *burðardygt*, so at tað hóskar til endamálsorðingina í lógaruppskotinum og ikki kann misskiljast.

Til 4

Tað var ST-frágreiðingin *Okkara felags framtíð*, sum í 1987 á fyrsta sinni setti alheimsburðardygd á breddan. Burðardygg menning snýr seg í høvuðsheitum um at nøkta tørvin í dag uttan at oyðileggja møguleikarnar hjá komandi ættarliðum. Til hetta krevst, at virksemið í samfelagnum verður lagað soleiðis til, at tað er í samljóði við tær vistfrøðiligu fyritreytirnar hjá náttúruni.

Sum nevnt verður í teimum almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið, samdust øll tey 193 limalondini í ST í 2015 um 17 burðardygg menningarmál, sum londini skulu miða eftir at røkka fyri 2030. Tað yvirskipaða endamálið við menningarmálunum er at geva øllum heimsins íbúgvum eitt virðiligt lív og fremja burðardygga atferð, so at jørðin verður latin komandi ættarliðum í góðum standi. Heimsmál nr. 14 og 15 snúgva seg um at verja lívið ávikavist í havinum og á landi, og í undirpunktunum til tað 15. heimsmálið er m.a. ásett, at londini skulu gera sítt til at røkja vistskipanir, steðga lívmargfeldissvinni og brúka náttúruna burðardygt í samsvari við altjóða avtalur.

5. Viðvíkjandi § 7, stk. 1, nr. 5, sum ásetur, at landsstýrismaðurin við kunngerð ella fyrisitingaravgerð kann loyva tøku av villum ryggdýrum *til gransking, undirvísing ella flokkanarvirksemi*, vísir Heilsufrøðiliga starvsstovan á, at sambært § 10 í djóravælferðarlógini krevst loyvi frá landsdjóralæknanum at brúka djór til m.a. royndir og undirvísing.

Til 5

§ 7 í uppskotinum til náttúruverndarlóg, sum heimilar landsstýrismanninum við kunngerð ella fyrisitingaravgerð at loyva aðrari tøku enn veiðu av villum ryggdýrum, skal skiljast í samanhangi við § 6, stk. 1, sum ásetur, at veiða og onnur tøka av dýrum, sum natúrliga liva vill, bara kann fara fram sambært lóg ella avgerð við heimild í lóg.

§ 7 er ætlað at loyva tøku til tey í lógargreinini nevndu endamálini, tá ið heimild ikki er fyri slíkari tøku eftir aðrari lóggávu. Í viðmerkingunum til § 7 verður gjørt greitt, at hevur ein geiralóg somu heimildir at loyva aðrari tøku av villum ryggdýrum, eiga hesar at verða brúktar.

Ásetingin í § 10 í djóravælferðarlógini er ikki ein tøkuheimild, men setur krøv um loyvi frá landsdjóralæknanum til at brúka djór til royndir og undirvísing.

Í teimum førum, har ið eingin tøkuheimild finst í geiralóggávu, kann landsstýrismaðurin, sum varðar av náttúruverndarlógini, eftir § 7, stk. 1, nr. 5, loyva *tøku av villum ryggdýrum* til granskingar- og undirvísingarendamál og til flokkanarvirksemi. Eitt loyvi til tøku eftir náttúruverndarlógini sleppir tó ongum undan at útvega sær onnur loyvir, sum krevjast eftir aðrari lóggávu, t.d. djóravælferðarlógini.

Skoytt verður upp í tær serligu viðmerkingarnar til § 7, stk. 1, nr. 5, at sambært § 10 í djóravælferðarlógini krevst loyvi frá landsdjóralæknanum til at brúka dýr til m.a. royndir og undirvísing.

6. Viðvíkjandi § 12 í uppskotinum til náttúruverndarlóg vísir Heilsufrøðiliga starvsstovan á, at í sambandi við ta sokallaðu veterineravtaluna millum Føroyar og ES (avgerð nr. 1/2001 hjá ES-kommissiónini), eru kunngerðir settar í verk viðvíkjandi inn- og útflutningi, m.a. kunngerð nr. 58 frá 30. apríl 2002 um veterinert eftirlit í sambandi við samhandil og inn- og útflutning av dýraúrdráttum og øðrum, sum ikki er ætlað til matna.

Til 6

Kunngerðirnar, sum sipað verður til, skulu tryggja veteriner fyrilit í sambandi við inn- og útflutning av dýrum.

Eftir § 12 í uppskotinum til náttúruverndarlóg kann landsstýrismaðurin í náttúrumálum áseta reglur um innflutning og útflutning av deyðum ella livandi eintøkum ella pørtum av dýra- og plantusløgum (*species*), sum natúrliga liva vill. Slíkar kunngerðir kunnu ásetast til at verja dýra- og plantusløg, sum natúrliga liva vill, og kunnu eisini vera ein liður í at halda altjóða skyldur.

7. Sambært § 15, stk. 3, 4. pkt., í uppskotinum, sum sent verða til hoyringar, kann loyvi ikki gevast eftir náttúruverndarlógini til útseting í ósamsvari við forboð ásett við í heimild í løgtingslóg um innflutning av vandamiklum dýrum. Í teimum serligu viðmerkingunum verður víst til heimildina § 1, stk. 1, í løgtingslóg um innflutning av vandamiklum dýrum og § 3, stk. 2, í kunngerð um innflutning av eksotiskum dýrum, sum ásetur, at tað er forboðið at sleppa eksotiskum dýrum út í føroysku náttúruna.

Heilsufrøðiliga starvsstovan vísir í tí sambandi á, at eisini § 15 í løgtingslóg um djóravælferð setur bann fyri at sleppa dýrum út í náttúruna, um tey ikki natúrliga hoyra heima har, ella um orsøk er at halda, at dýrini kunnu vera tí natúrliga stovninum, øðrum dýrastovnum ella plantulívinum at bága. Sambært teimum serligu viðmerkingunum til § 15 í løgtingslóg um djóravælferð skal heimildin at sleppa ávísum djórum út í náttúruna tulkast avmarkandi, og valdar ivi, um eitt dýr kann hava negativa ávirkan á føroysku náttúruna, dýra- ella plantulívið, skal dýrið als ikki sleppast út í náttúruna.

Til 7

Av tí at tað er landsstýrismaðurin í veterinermálum, sum varðar av løgtingslóg um djóravælferð, og endamálið við løgtingslógini sambært § 1 er at fremja djóravælferð, djóravernd og virðing fyri tomum sum villum djórum, verður § 15 um útseting at tulka eftir einum veterinerum endamáli, hóast fyrilitini, sum nevnd verða í viðmerkingunum til § 15, minna nógv um náttúruverndar- og vistskipanarfyrilit.

Tað er landsstýrismaðurin í náttúrumálum, sum varðar av náttúruvernd, og forboðið eftir § 15 í uppskotinum til náttúruverndarlóg fyri útseting uttan loyvi frá landsstýrismanninum skal tryggja náttúrufyrilit. Til at meta um slík fyrilit krevst náttúrufakligur førleiki, og slíkan førleika skal náttúrufyrisitingin undir landsstýrismanninum hava.

§ 15, stk. 3, 4. pkt., verður umorðað, so at loyvi ikki kann gevast til útseting í ósamsvari við forboð sambært *aðrari lóggávu*. Í teimum serligu viðmerkingunum til ásetingina verður so bæði víst til kunngerðina um innflutning av eksotiskum dýrum og § 15 í løgtingslóg um djóravælferð.

8. Viðvíkjandi § 13, stk. 3, í uppskotinum til náttúruverndarlóg, sum ásetur, at kemur skaði ella vandi fyri álvarsligum skaða á lívmargfeldi fyri, *orsakað av at fremmandar lívverur verða settar út* ella ótilætlað sleppa út, skal tann, sum hevur ábyrgdina, beinanvegin boða landsstýrismanninum frá og taka stig samsvarandi §§ 38 og 39, sigur Heilsufrøðiliga starvsstovan, at tað ikki er loyvt at seta fremmand dýrum í náttúruna.

Til 8

Hugtakið *fremmand lívvera* fevnir ikki bara um dýr, men er allýst sum *lívvera, sum ikki hoyrir til nakað slag ella nakran stovn, sum finst natúrliga á staðnum*, sbr. § 3, nr. 1. *Lívvera* er allýst sum

einstaklingur av plantum, dýrum og smáverum, íroknaðir allir partar, sum kunnu nørast ella flyta ílegutilfar, sbr. § 3, nr. 5.

9. Viðvíkjandi § 14 sigur Heilsufrøðiliga starvsstovan seg mæla staðiliga frá at fara inn um geiran hjá landslæknanum viðvíkjandi innflutningi av dýrum.

Til 9
Innflutningskrøv til at verja lívmargfeldið eru ikki geirin hjá landslæknanum.

10. Viðvíkjandi § 17 í uppskotinum til náttúruverndarlóg, sum nágreinar, at loyvir eftir løgtingslógini ikki sleppa nøkrum undan at fáa loyvir til innflutning ella útseting, sum krevjast eftir aðrari lóggávu, sigur Heilsufrøðiliga starvsstovan, at vandi er fyri *lógarkonflikt*. Heilsufrøðiliga starvsstovan vísir á, at eftir løgtingslóg um djóravælferð er meginreglan, at tað als ikki er loyvt at seta dýr út í føroysku náttúruna, um tey ikki natúrliga hoyra heima har.

Til 10
Sí svar til nr. 7 omanfyri.

11. Fyri at sleppa undan eini møguligari lógarkonflikt skjýtur Heilsufrøðiliga starvsstovan upp at allýsa hugtakið *lívvera* øðrvísi, so at tað ikki fevnir um dýr.

Til 11
Dýr í sjálvum sær hoyra ikki heima í ávísum geira.

Tilmælið verður ikki tikið til eftirtektar.

Fundur
Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur síðan ta almennu hoyringina hitt umboð fyri Landsdjóralæknadeildina á Heilsufrøðiligu starvsstovuni á fundi at umrøða tey ivamál um myndugleikaøkir, sum reist verða í hoyringarsvarinum.

Umboð fyri Landsdjóralæknadeildina vístu á, at endamálið við hoyringarsvarinum fyrst og fremst var at minna á og gera vart við lóggávu, sum longu er galdandi, tá ið ræður um at flyta inn og seta út dýr.

Partarnir vóru samdir um, at talan er um tvey ymisk myndugleikaøki – veterinerøkið og náttúruverndarøkið – sum varða ymsum fyrilitum og krevja ymiskan fakligan førleika, men at tað er umráðandi, at tey bæði myndugleikaøkini hava fyrilit fyri regluverkinum hjá hvørjum øðrum.

Partarnir vóru samdir um, at annað myndugleikaøkið ikki kann loyva nøkrum, sum er bannað eftir regluverkinum hjá hinum myndugleikaøkinum.

Partarnir vóru samdir um, at tey bæði myndugleikaøkini stundum kunnu umskarast, og at myndugleikarnir eiga at samstarva um at greiða møgulig ivamál hesum viðvíkjandi.

Partarnir vóru samdir um, at so leingi regluverkið eftir veterinerlóggávuni er nøktandi til at verja náttúrumargfeldið, verður ikki viðkomandi at áseta nærri reglur eftir náttúruverndarlóggávuni, hóast lógaruppskotið hevur heimildirnar.

Verður í framtíðini tørvur á reglum eftir náttúruverndarlógini um t.d. loyvi til at flyta inn ávís dýr, kann talan verða um at samskipa tær báðar loyvisskipanirnar til at lætta um hjá borgaranum.

Fiskaaling
1. Fiskaaling sigur tað hava týdning at skipa eina nationala eftiransing, sum er lagað til føroysk viðurskiftir, og sum fevnir um skipaða innsavning av sýnum, kanningarætlanir og viðgerð av úrslitum. Fiskaaling sigur, at slík eftiransing tryggjar, at neyðugar kanningar verða gjørdar, umframt at skipað innsavning av data tryggjar tíðarseriur, sum hava týdning, tá ið metingar skulu gerast við atliti at møguligum broytingum í náttúruni.

Fiskaaling sigur eisini, at data eiga at verða goymd og skipað, so at til ber at gagnnýta tey í ymsum samanhangi og soleiðis áhaldandi at fáa vitan, sum kann vera grundarlag undir, hvussu vit gagnnýta náttúruna.

Til 1
Einki at viðmerkja.

Bóndafelag Føroya
1. Bóndafelag Føroya mælir til at gera ein lendisætlan fyri landið, áðrenn lógarverk sum uppskotið til náttúruverndarlóg verður sett í gildi. Sagt verður, at ein lendisætlan er grundarsteinurin fyri, hvagar vit skulu menna okkum við føroyskum landbúnaði.

Til 1
Náttúruvernd sambært uppskotinum verður ikki mett at vera til hindurs fyri arbeiðinum at gera eina lendisætlan.

Tilmælið verður ikki tikið til eftirtektar.

Føroya náttúru- og umhvørvisfelag og Ringrás
1. Føroya náttúru- og umhvørvisfelag og Ringrás halda tað vera óheppið, at 2. kapittul í lógaruppskotinum hjá undanfarna landsstýri er tikin burtur úr uppskotinum.

Til 1
Sambært teimum almennu viðmerkingunum til uppskotið til náttúruverndarlóg skal sitast fyri náttúruverndarlógini samsvarandi røktarmiðunum og meginreglunum, sum stóðu í 2. kapitli í lógaruppskotinum hjá undanfarnu samgongu.

Landsstýrið tekur tó ikki undir við at varðveita 2. kapittul í uppskotinum hjá undanfarna landsstýri, sum var tvørsektoriellur og álegði *øllum* myndugleikum, sum taka avgerðir við ávirkan á náttúrumargfeldi, serligar fyrisitingarligar skyldur. Skulu slík krøv setast, verður mælt til at áseta tey í geiralóggávuni sambært vanligum føroyskum lóggávusiði.

2. Føroya náttúru- og umhvørvisfelag og Ringrás halda, at tað átti at verið staðfest í lógaruppskotinum, at náttúruverndarfelagsskapir eru hoyringarpartar í náttúruverndarmálum.

Til 2

Uppskot til verndartiltøk eftir náttúruverndarlógini verða send í almenna hoyring, og tí verður ikki mett, at tørvur er á at staðfesta hetta í lógaruppskotinum.

3. Føroya náttúru- og umhvørvisfelag og Ringrás mæla til at nevna vernd av vát- og mólendi í lógaruppskotinum og vísa á, at í sunnum mólendi taka mosi og aðrar plantur koltvíiltu upp úr atmosferuni til plantuvøkstur, so at planturnar orsakað av tí váta lendinum ikki verða niðurbrotnar, tá ið tær doyggja, og tí verða til mógv, sum goymir kol í jørðini.

Til 3
Til ber at verja serlig náttúrusløg sum vát- og mólendi bæði við økisvernd eftir 4. kapitli og sum vistfrøðilig nyttuøkir hjá vardum dýra- og plantusløgum eftir 2. kapitli.

4. Føroya náttúru- og umhvørvisfelag og Ringrás halda lógaruppskotið geva landsstýrismanninum ov stórt vald at loyva undantøkum. Sagt verður, at tá ið orðingar sum *tá ið týðandi samfelagsáhugamál gera tað neyðugt* verða brúktar, verður ofta ikki nágreinað, hvat ið talan er um. Sagt verður eisini, at einki krav verður sett um vísindaliga prógvbyrðu í sambandi við undantøk.

Til 4
Í teimum serligu viðmerkingunum til § 5 verður greitt frá, at við øðrum týðandi samfelagsáhugamálum meinast fíggjarligir, sosialir og mentanarligir tørvir og tørvurin á skynsamari tilfeingisfyrisiting.

Tann pragmatiski leisturin, sum lógaruppskotið byggir á, verður samanumtikið mettur at føra okkum longst á náttúruverndarleið.

Sambært teimum almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið skal sitast fyri lógini samsvarandi vitanarregluni, sum ásetur, at avgerðir viðvíkjandi náttúrumargfeldinum, so langt sum tað er rímiligt, skulu byggja á tøka vísindaliga vitan um stovnsstøðuna hjá sløgum, útbreiðsluna og tann vistfrøðiliga standin hjá náttúrusløgum og virknaðin av árinum.

5. Føroya náttúru- og umhvørvisfelag og Ringrás fýlast á, at lógaruppskotið einki nevnir um altjóða skyldur og sáttmálar, sum Føroyar hava tikið undir við, og halda, at hetta átti at verið ásett í lógini.

Til 5
Sum nevnt verður í teimum almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið, ger lógaruppskotið í sær sjálvum sítt til at lúka altjóða skyldur, sum Føroyar hava átikið sær, serliga sambært ST-sáttmálanum um lívmargfeldi. Í tí teimum serligu viðmerkingunum til lógargreinirnar eru eisini fleiri tilvísingar til altjóða sáttmálar.

Tilmælið um at nevna altjóða sáttmálar í sjálvum lógartekstinum verður ikki tikið til eftirtektar.

6. Føroya náttúru- og umhvørvisfelag og Ringrás fýlast á, at lógaruppskotið ikki í nøktandi mun ásetur, hvussu gransking skal fremjast fyri at tryggja hóskandi, samanhangandi yvirlit yvir gongdina í føroysku náttúruni, so at til ber at meta, um miðini eftir lógini verða hildin.

Til 6

Sambært teimum almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið eru náttúruskrásetingar- og kortleggingararbeiði ein fyritreyt fyri, at lógin fæst at virka eftir sínum endamáli, hóast fullfíggjað skráseting av dýra-, plantu- og náttúrusløgum ikki krevst.

Bóndafelag Føroya og Føroya Óðalsfelag (26. januar 2022)
1. Bóndafelag Føroya og Føroya Óðalsfelag siga, at lógaruppskotið flytur ræðisrættin yvir uttangarðsjørðini frá festarum og óðalsfólki til almennu fyrisitingina, og at hetta er brot á § 73 í grundlógini.

Til 1
Við økisvernd eftir 4. kapitli í lógaruppskotinum *kann* landsstýrismaðurin regulera tað faktiska ræðið á økjum uttangarðs, t.e., at hann *kann* gera inntriv í eigararæðið hjá festarum og óðalsfólki. Hetta kann tó bara gerast, í tann mun tað *krevst* til at verja náttúruvirðir. Slíkar heimildir eru ikki nýggjar í føroyskari lóggávu, tí hetta sama kunnu friðingarmyndugleikarnir eftir galdandi náttúrufriðingarlóg frá 1970.

At eitt verndarøki verður skipað eftir 4. kapitli í lógini ber *ikki* í sær, at landið tekur við ognarrættinum til tað varda økið. Landið fær einki ræði á verndarøkinum annað enn atgongd at skipa fyri ávísari røkt til at røkja verndarendamálið, sbr. § 28. Jarðareigarin varðveitir tað løgfrøðiliga ræðið á økinum umframt alt tað faktiska ræðið, sum ikki ítøkiliga er avmarkað av verndarásetingunum.

Økisvernd eftir 4. kapitli í lógini ber ikki í sær, at jarðareigarin missir ognarrættin til lendið, og tí verður heldur ikki talan um endurgjald fyri ognartøku av lendi. Økisvernd kann tó sambært tí serligu endurgjaldsásetingini í § 30, stk. 1, geva rætt til endurgjald fyri fíggjarligan miss, sum stendst av, at verndin darvar brúk, sum er í gongd. Heldur ein festari ella jarðareigari seg vera fyri missi, sum fellur uttan fyri § 30, stk. 1, kann hann reisa krøv hesum viðvíkjandi eftir vanligum endurgjaldsreglum.

2. Bóndafelag Føroya og Føroya Óðalsfelag siga, at eftir galdandi náttúrufriðingarlóg er mannagongdin, at er talan um mál, sum eru fevnd av gildisøkinum hjá lógini, skal søkjast um loyvi frá friðingarnevndini á staðnum.

Til 2
Við uppskotinum til broyting í løgtingslóg um náttúrufriðing, sum lagt verður fram saman við uppskotinum til løgtingslóg um náttúruvernd, verða friðingarheimildirnar í náttúrufriðingarlógini strikaðar. Hetta er ein liður í, at umsitingin av myndugleikaøkinum náttúruvernd verður flutt frá friðingarmyndugleikunum eftir náttúrufriðingarlógini inn undir landsstýrsmannin.

Eftir tí nýggju náttúruverndarlógini verður tað landsstýrismaðurin, sum við kunngerð skal kunna seta náttúruverndartiltøk í verk.

Nógv tey flestu málini, sum í dag verða viðgjørd í teimum staðbundnu friðingarnevndunum og yvirfriðingarnevndini, eru ikki fiðingarmál, men umsóknir um verkætlanir o.a. í økjum, har tað eftir lógini krevst loyvi frá friðingarmyndugleikunum. Henda skipanin heldur fram sum áður. Hesar

reglurnar um lendisdisponering verða mettar at hoyra heima í tí nýggju náttúruverndarlógini, men kunnu í framtíðini gerast partur av dagførdari skipanarlóggávu.

Seinasta galdandi økisfriðing eftir náttúrufriðingarlógini varð gjørd í 1988, og heimildin at friða dýra- og plantusløg og jarðfrøðilig fyribrigdir við kunngerð eftir tilmæli frá yvirfriðingarnevndini er ongantíð brúkt.

3. Bóndafelag Føroya og Føroya Óðalsfelag siga lógaruppskotið venda skipanini á náttúruverndarøkinum á høvdið, við tað at landsstýrismaðurin nú fær heimild at áseta reglur og skipa verndarøkir.

Til 3
Samsvarandi tí, sum mælt hevur verið til í áratíggjur, og í samsvari við meginregluna í § 1 í stýriskipan Føroya, verður fyrisitingin av náttúruvernd loksins løgd undir landsstýrismannin í náttúrumálum

Longu í 2000 varð ein arbeiðsbólkur settur at lýsa støðuna og galdandi lóggávu á m.a. náttúruverndarøkinum og koma við uppskotum um ábøtur. Í frágreiðing, sum arbeiðsbólkurin læt úr hondum í 2001, varð m.a. staðfest, at náttúrufriðingarlógin frá 1970 als ikki nøktaði tørvin á náttúrufyrisiting í Føroyum, og mælt varð til at skipa eina samlaða náttúru- og umhvørvisfyrisiting við beinleiðis tilvísing til landsstýrismannin. Samsvarandi hesum hevur í fleiri umførum verið arbeitt við at orða nýggja náttúruverndarlóggáva at skipa fyrisiting av náttúruvernd undir avvarðandi landsstýrismanni.

4. Bóndafelag Føroya og Føroya Óðalsfelag siga, at kærurætturin hjá festarum og óðalsfólki verður gjørdur munandi veikari enn eftir galdandi skipan.

Til 4
Eftir galdandi náttúrufriðingarlóg skulu allar avgerðir hjá teimum staðbundnu friðingarnevndunum staðfestast av yvirfriðingarnevndini. Úrskurðir hjá yvirfriðingarnevndini eftir náttúrufriðingarlógini kunnu hinvegin ikki skjótast inn fyri dómstólarnar, sbr. § 24, men nevndin kann sjálv taka mál upp aftur og broyta avgerðir, sum hon hevur tikið.

Eftir uppskotinum til náttúruverndarlóg skal landsstýrismaðurin kunna skipa verndarøkir og verja dýra- og plantusløg við kunngerð. Í sambandi við økisvernd leggur lógaruppskotið stóran dent á, at taka jarðareigarar við upp á ráð tíðliga í tilgongdini.

Verða verndarøkir skipað, skulu avgerðir sambært teimum ásettu reglunum kunna kærast til Føroya Kærustovn.

Mótsett tí, sum geldur eftir galdandi náttúrufriðingarlóg, skulu allar avgerðir eftir náttúruverndarlógini kunna roynast í rættarskipanini.

5. Bóndafelag Føroya og Føroya Óðalsfelag siga tað vera óhoyrt at geva einum landsstýrismanni so víðar ognartøkuheimildir í kunngerð, og at hetta ikki er sæð fyrr í føroyskari rættarsøgu.

Til 5

Friðingarmyndugleikarnir eftir galdandi náttúrufriðingarlóg hava víða heimild at ognartaka til friðingarendamál. Sambært § 16 í náttúrufriðingarlógini kann ognartøka fara fram, *um friðingin ikki kann fara fram, uttan at eigarin missir lendi*.

Sum nevnt undir pkt. 1 ber økisvernd eftir 4. kapitli í uppskotinum til náttúruverndarlóg *ikki* í sær, at landið tekur við ognarrættinum til tað varda økið. Landið fær einki ræði á verndarøkinum annað enn atgongd at skipa fyri ávísari avmarkaðari røkt til at røkja verndarendamálið, sbr. § 28.

Tó verður ein avmarkað ognartøkuheimild til røktar- og umvælingarinntriv, sum munandi broyta standin, sum náttúran er í, sett inn í § 32 í lógaruppskotinum. Henda heimildin kann ikki brúkast til at flyta ognarrættin til sjálvt verndarøkið, uttan so at røktar- ella umvælingartørvir í hendinga føri skuldu kravt tað til at fremja tað ítøkiliga verndarendamálið sambært verndarkunngerðini. Ognartøka eftir § 32 kann sostatt snúgva seg um at ognartaka sjálvt ræðið at disponera yvir lendinum við røktar- og umvælingarinntrivum, uttan at ognarrætturin til lendið verður fluttur. Sambært teimum serligu viðmerkingum til ásetingina skal ognartøka til røktar- og umvælingarendamál vera síðsti valmøguleiki. Miðað eigur altíð fyrst at verða eftir at fáa eina rímiliga avtalu í lag við jarðareigaran um røktar- og umvælingartiltøk. Hetta geldur bæði fyri røktartiltøk, sum landsstýrismaðurin kann fremja innan fyri karmin á § 28, og tiltøk, sum landsstýrismaðurin ikki kann fremja eftir § 28. Tað er bara, tá ið tørvur er á røktar- ella umvælingartiltøkum, sum ikki rúmast innan fyri heimildina í § 28, og har ið rímilig privatrættarlig avtala *ikki* fæst í lag við jarðareigaran, at talan *kann* gerast um at ognartaka til tað avmarkaða endamálið.

6. Bóndafelag Føroya og Føroya Óðalsfelag siga heimildirnar hjá landsstýrismanninum at lýsa verndarøkir vera so víðfevndar, at útrakstur av seyði í haganum verður munandi darvaður og í nøkrum førum heilt ógjørligur.

Til 6
Sum nevnt, gevur galdandi náttúrufriðingarlóg verandi friðingarmyndugleikum víðfevnda heimild at friða økir.

Uppskotið til náttúruvernd gevur við ymsum sløgum av verndarøkjum meira fjøltáttað amboð til økisvernd, men leggur í størri mun enn galdandi lóggáva dent á, at øll verndartiltøk skulu standa í rímiligum lutfalli við tað ítøkiliga verndarendamálið, soleiðis at tað ongantíð skulu vera lagdar størri avmarkingar á eitt øki, enn hvat ið krevst til tað ítøkiliga verndarendamálið, sum skal var vera greidliga nágreinað í verndarkunngerðini. Lógaruppskotið leggur harumframt stóran dent á samstarv við tey, sum varða av jørðini, og at taka tey við upp á ráð, longu áðrenn farið verður undir arbeiði við eini verndarkunngerð.

At verndarøkir verða skipað eftir kapitli 4, verður vanliga ikki til hindurs fyri, at útrakstur av seyði í haganum kann halda fram sum áður, sbr. m.a. § 19, stk. 5, og § 21, stk. 2.

Verður í hendinga føri talan um, at økisvernd darvar útrakstur, hevur jarðareigarin ella rættindahavarin rætt til endurgjald fyri fíggjarligan miss orsakað av hesum, sbr. § 30.

7. Bóndafelag Føroya og Føroya Óðalsfelag vilja verja við, at lógaruppskotið tekur øll lunnindir frá jørðini. Sum dømi vísa tey til § 6, stk. 3, sum tey halda tekur livandi tilfeingi í áum og vøtnum frá

jørðini og leggur tað undir løgtingslóg um sjófeingi. Víst verður eisini til § 7, og sagt verður, at rætturin til fuglaveiðu verður loystur frá jørðini og lagdur til fyrisitingarmyndugleikan. Í báðum førum er talan um ognartøku, verður sagt.

Til 7
§ 6, stk. 3, leggur einki undir sjófeingislógina.

Ásetingarnar í § 6, stk. 3, § 8, stk. 4, og § 9, stk. 4, áseta bara, at gagnnýtsla og tøka, sum eru fevndar av sjófeingislógini, ikki eru fevndar av § 6, 8 og 9 í náttúruverndarlógini. Ásetingarnar endurgeva bara galdandi rætt, at løgtingslóg um sjófeingi fevnir um sjógv, áir vøtn, ósar og løkir, sbr. § 1, stk. 2, og § 34, stk. 7, í sjófeingislógini.

Sambært teimum almennu viðmerkingunum til løgtingslóg um sjófeingi skal, tá ið sitið verður fyri lógini, leggjast upp fyri burðardyggari stovnsrøkt og fyrivarnisregluni og vistskipanarregluni. Tí verður mett, at náttúrufyrilitini í sambandi við tøku eru nóg væl vard eftir sjófeingislógini.

§ 7 í uppskotinum til náttúruverndarlóg hongur beinleiðis saman við § 6, stk. 1, sum ásetur, at øll veiða og tøka av dýrum, sum natúrliga liva vill, skal fara fram sambært lóg. Tá ið talan er um fugl, skilst sama meginregla á § 17, stk. 1, í føroysku fuglaveiðulógini, sum ásetur, at allur fuglur, sum ikki er tilskilaður í fuglaveiðulógini, er friðaður fyri skjóting og veiðu.

Øll veiða og onnur tøka av dýrum, sum natúrliga liva vill, skulu sambært § 6, stk. 1, fara fram sambært lóg, men er eingin onnur lóggáva, sum heimilar veiðu og tøku av einum dýri, sum natúrliga livir vilt, kann landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum sambært § 7, stk. 1, í uppskotinum til náttúruverndarlóg loyva tøku m.a. til at verja plantur og dýr, til at verja fyri skaða á gróði, til at verja húsdýr, fisk, vatn ella aðra ogn og til at tryggja almenn heilsu- og trygdarfyrilit ella onnur týðandi almenn áhugamál. Tøka, sum er fevnd av aðrari lóggávu, skal enn sum áður fara fram eftir tí lóggávuni. § 7 heimilar landsstýrismanninum í náttúrumálum sum varðandi av meginregluni í § 6, stk. 1, at loyva tøku til tey nevndu endamálini, um eingin heimild finst í geiralóggávuni.

8. Viðvíkjandi §§ 30-31 um endurgjald fyri fíggjarligan miss, orsakað av at vernd darvar brúk, sum er í gongd, siga Bóndafelag Føroya og Føroya Óðalsfelag, at reglurnar eru snikkaðar soleiðis til, at tað skal verða so lætt sum gjørligt at seta festarar og jarðareigarar til viks. Sagt verður, at endurgjald fyri inntriv heldur skal veitast eftir vanligum endurgjaldsreglum. Viðvíkjandi § 32, sum ásetur, at jarðareigarar og rættindahavarar skulu hava sett fram krav um endurgjald, innan fyri fýra mánaðir frá tí at verndarkunngerðin er komin í gildi, siga Bóndafelag Føroya og Føroya Óðalsfelag, at ásetingin vendir øvut, tí at vanlig manngongd, tá ið tað almenna ognartekur jørð, er, at myndugleikarnir venda sær til jarðareigaran við uppskoti um endurgjald fyri lendið, sum tikið verður. Sagt verður, at ásetast má sum minstamark, at endurgjaldskrøv kunnu ásetast gjøgnum rættarskipanina, sum vanligt er í sambandi við ognartøku.

Til 8
At eitt verndarøki verður skipað eftir § 19 í uppskotinum, ber ikki í sær, at landið tekur við ognarrættinum til tað varda økið. Landið fær einki ræði á verndarøkinum annað enn atgongd at skipa fyri ávísari røkt til at røkja verndarendamálið, sbr. § 28. Jarðareigarin varðveitir tað

løgfrøðiliga ræðið á økinum umframt alt tað faktiska ræðið, sum ikki ítøkiliga er avmarkað av verndarásetingunum. Av tí at økisvernd eftir § 19 ikki er ognartøka av lendi, verður ikki talan um endurgjald fyri slíka ognartøku.

Tó *kann* økisvernd sambært tí serligu endurgjaldsregluni í § 30, stk. 1, geva rætt til endurgjald fyri fíggjarligan miss, sum stendst av, at verndin darvar brúk, sum er í gongd.

Ásetingin í § 30, stk. 1, er ein seráseting um endurgjald í sambandi við ræðisregulering í sambandi við økisvernd. Ásetingin geldur ikki fyri onnur ræðisinntriv eftir lógini. Í sambandi við onnur inntriv verða endurgjaldsspurningar tí at greiða eftir vanligum óskrivaðum reglum um endurgjald fyri ræðisinntriv, sbr. § 73 í grundlógini.

Nevnast kann, at longu eftir galdandi náttúrufriðingarlóg hava øll, eisini festarar og jarðareigarar, lógarbundna skyldu at fara fram við fyriliti og varsemi í náttúruni og einki at gera, sum kann skaða ella skemma, sbr. náttúrufriðingarlógina § 1, stk. 1. Og longu eftir galdandi rætti er tað so, jarðareigarar og festarar mugu lata sær lynda, at ávísar avmarkingar kunnu vera lagdar á ognirnar orsakað av náttúrufyrilitum. Festarar og jarðareigarar kunnu eitt nú ikki byggja nakað uttangarðs uttan við loyvi frá friðingarnevndini, sbr. § 2, stk. 1. Undantiknir eru smærri bygningar, sum eftir gomlum siði vanliga hava verið bygdir uttangarðs í sambandi við landbúnað, um teir ikki skemma náttúruna. Festarar ella jarðareigarar kunnu heldur ikki fara undir arbeiðir, sum kunnu broyta sermerkt landslag munandi ella týna leivdir av sermerktari náttúru, uttan við loyvi frá friðingarnevndini. Gera teir tað kortini, kann friðingarnevndin nokta fyri, at arbeiðið heldur fram, og krevja, at alt verður gjørt aftur, sum tað var, sbr. § 4, stk. 2.

Endamálið við ásetingunum um endurgjald fyri fíggjarligan miss, orsakað av at verndin darvar brúk, sum er í gongd, er at hava greiðar reglur, sum kunnu minka um nakrar av ósemjunum, sum annars kunnu standast av økisvernd. Ásetingarnar eru orðaðar soleiðis, at tað er virknaðurin fyri jarðareigaran ella rættindahavaran av ræðisreguleringini, sum ein verndarkunngerð kann bera í sær, sum er avgerandi fyri støddina á endurgjaldinum. Fyrilitið fyri líkaviðgerð av sambæriligum førum hevur eisini havt týdning fyri endurgjaldsreglurnar, sum skotnar verða upp fyri økisvernd.

Mett verður, at avgerandi munur er á, hvat rættarvernd ið tann einstaki eigur at hava fyri inntrivum í verandi virksemi ella brúk, sum er í gongd, og inntrivum í møguliga framtíðargagnnýtslu av einum øki.

Við reglunum um endurgjald fyri fíggjarligan miss, orsakað av at verndin darvar brúk, sum er í gongd, slepst undan, at ov stórar upphæddir verða brúktar til sakførarar og sakkøn í sambandi áseting av endurgjaldi fyri rættinum. Í Norra, haðan íblásturin til endurgjaldsreglurnar er fingin, vóru royndirnar, at staturin brúkti stórar upphæddir upp á endurgjaldsmál viðvíkjandi smáum inntrivum í eigararæðið. Í fleiri málum vóru útreiðslurnar til sakførarar og sakkøn tí størri enn endurgjaldsupphæddirnar, sum goldnar vórðu.

Reglurnar í § 31 um sjálva endurgjaldsásetingina skulu somuleiðis minka um kostnaðaðin í sambandi við endurgjaldsuppgerðina, við at jarðareigarar og rættindahavarar fáa ein ávísan prosessváða, við at mál, sum eru lítil í vavi fíggjarliga, í størri mun kunnu loysast við samráðing, og við at ásettar verða reglur við føstum, objektivum treytum fyri, nær ið endurgjald skal gjaldast.

Heldur ein festari ella jarðareigari seg vera fyri missi, sum fellur uttan fyri § 30, stk. 1, kann hann reisa krøv hesum viðvíkjandi eftir vanligum endurgjaldsreglum.